FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2023

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.lms.fo

# RØÐA LØGMANS

Eg skal í dag byrja við tveimum orðum, sum ongantíð fyrr eru søgd í eini løgmansfrágreiðing. Tvey orð, sum tykjast smá, men sum kortini bera boð um eina nýggja javnvág:

»Frú forkvinna!«

Vónandi fara vit politikarar at ganga undan við javnari kynsumboðan í landsstýri og álitissessum eisini frameftir.

Tað, vit gera, avdúkar jú, hvørji vit eru. Hvørji vit vilja vera.

***

Frú forkvinna.

Úti í Tinganesi er ein lon, kallað Vektarbúðin, sum var partur av handilsvirkseminum.

Í Vektarbúðini vórðu vørur skipaðar inn og út. Allar vørur vórðu lagdar á vágskálina og vigaðar. Gjaldið skuldi samsvara við vektina, tá ið fólk keyptu og seldu.

Tað skuldi javnviga.

Troyggjur og turrur fiskur, sukur og seymur – alt varð vigað, og síðani varð prísurin ásettur.

Nú er Vektarbúðin partur av løgmansskrivstovuni.

Henda lonin minnir okkum á, at eins og javnvág søguliga var aðalmálið í Tinganesi, so skal javnvág áhaldandi vera okkara mál.

Vit skulu stremba eftir at finna røttu javnvágina millum kynini, millum alment og privat, millum útjaðaran og miðstaðarøkið, millum at troyta og verja umhvørvið, millum familjulív og arbeiðslív – ja – snøgt sagt – í øllum.

Fram um alt mugu vit fáa eina fíggjarliga javnvág, sum varir við. Eina langtíðar javnvág millum inntøkur og útreiðslur, so vit kunnu lyfta vælferðarskyldurnar á bestan hátt – eisini frameftir. Vit mugu tryggja børnunum minst líka góða vælferð, sum vit hava í dag.

Tað er ein torfør uppgáva.

Tí javnvág kemur ikki av sær sjálvari. Javnvág er nakað, sum vit alla tíðina mugu skapa.

***

Frú forkvinna.

Føroyar verða ofta kallaðar eitt familjuland. Einki lodd á lívsins vekt kann javnviga við okkara næstu. Og tað, sum vigar hjá føroyingum, eigur eisini at viga hjá okkum politikarum.

Tí bøta vit um javnvágina ímillum arbeiðslív og familjulív. Arbeiðsplássið er í áravís farið við bróðurpartinum av okkara bestu tíð, og familjan hevur fingið tað, sum eftir er.

Men stytta vit arbeiðsvikuna úr 40 niður í 37 tímar, flyta vit tríggjar tímar frá arbeiðsvektskálini yvir í familjuvektskálina. Tríggir tímar hvørja viku fara at skapa betri javnvág.

Vit hava fyrr stytt arbeiðsvikuna, uttan at tað ávirkaði búskapin negativt. Tá tóku vit ein heilan dag. Nú taka vit tríggjar tímar.

Hesir tímarnir fara í fyrsta lagi at lætta um familjulívið. Í øðrum lagi fara tey, mest kvinnur í niðursettari tíð, at nærkast fullari tíð. Og í triðja lagi gerst føroyski arbeiðsmarknaðurin meiri dragandi.

Lógaruppskotið um at stytta arbeiðsvikuna verður latið løgtinginum í heyst.

***

Vilja vit finna javnvág, er kortini ikki nóg mikið at stytta arbeiðsvikuna.

Ójavnvág myndar eisini lønarlagið.

í 1969 varð politiskt gjørt av at bólka almenn starvsfólk í lønarflokkar. Kvinnustørvini vórðu tá hildin at viga minni enn størv hjá monnum, tí teir vóru uppihaldarar og máttu forvinna meira. Soleiðis er ikki longur.

Tí rætta vit nú hesa ójavnvág. Tey lægstløntu, sum starvast í eldra-, dagstovna- og almannaøkinum, fáa eitt lønarlyft.

Hesi størvini viga tungt á vælferðarvágskálini. Men har mangla fólk. Tá ið umsorganarøkini ikki virka nóg væl, rakar tað jú okkum øll. Ein meiri hóskandi løn fer sannlíkt at draga fleiri arbeiðsfólk.

***

Vit mugu eisini lætta um hjá øðrum, nú príshækkingar og rentuhækkingar tyngja.

Hjá lág- og miðalløntum minka vit skattin 1. januar, so lønin hjá eitt nú krambafólki, handverkarum og flakafólki røkkur eitt sindur longur.

Eg veit, at undirtøkan fyri at minka skattin er stór. Men fortreytin fyri skattalættanum er, at vit hava tillagað tøku- og veiðugjøld í vinnuni, so vit nú hava stóran part av fíggingini.

At tillaga gjøldini og minka lønarskattin skapar betri javnvág millum vinnufólk, sum troyta tilfeingið, og Føroya fólk, sum eigur tilfeingið.

Í vinnuni skal eisini vera javnvág. Rættindini skulu kosta, men ráð skulu framvegis vera til menning og íløgur. Vit meta ikki, at broyttu gjøldini hava skeiklað hesa javnvág.

Men fiski- og alivinnan skulu ikki bera alt einsamallar. Skulu vit minka um skattin og samstundis tryggja langtíðarjavnvágina í búskapinum, mugu átøk gerast á fleiri økjum.

***

Tí, frú forkvinna – langtíðarbúskapurin javnvigar ikki.

Til samanberingar verður barlastin umborð á skipum støðugt tillagað, so skipið ikki fær slagsíðu og í ringasta føri koppar.

Vit hava ikki í nóg stóran mun lagt upp fyri broytingum – serliga í fólkasamansetingini. Vit verða støðugt fleiri eldri, men lutfalsliga færri á arbeiðsmarknaðinum. Um 20 ár verða tvífalt so nógv yvir 80 ár sum í dag. Handla vit ikki nú, er ivasamt, um okkara børn megna at lyfta, tá ið vit gevast at arbeiða.

Misskiljið meg ikki: tað er sanniliga gott, at vit hava tað betri og liva longur. Men tað ger eisini, at útreiðslurnar í almanna- og heilsugeiranum økjast. Og vøksturin fer bara at standa við.

Vit mugu laga barlastina til fyri at tryggja kjølfestið, nú vektin umborð forskjýtur seg.

Í fyrsta lagi mugu vit fáa fleiri á arbeiðsmarknaðin. Tí skal samfelagið gerast so dragandi fyri unga ættarliðið, at tey ikki vilja búgva aðrastaðni. Og tí skulu pensjónistar kunna tjena meiri, áðrenn teir verða mótroknaðir. Tey, sum orka, skulu eggjast til at arbeiða longur.

Í øðrum lagi mugu vit tálma útreiðslunum og økja inntøkurnar.

Landsstýrið kannar, um almenni geirin virkar nóg væl. Hóskar hann til støddina á samfelagnum? Kunnu vit skipa okkum øðrvísi og bíligari? Vit noyðast at veita somu ella betri tænastur fyri somu ella færri útreiðslur. Tí vit verða støðugt færri at rinda.

Og vit skulu altíð minnast, at tá ið landið rindar, ja, so er tað Føroya fólk og føroysk vinna, sum rindar. »Almennir pengar« er bara eitt annað heitið fyri hart tjentar pengar. Tí skal hvør króna brúkast við skili. Samstundis mugu vit halda vælferðarskyldurnar. Tað er ein torfør javnvág. Men hon má finnast.

Lat meg sláa fast, at búskapurin er væl fyri, um vit skuldu fingið eitt tíðarskeið við mótgongd. Vit hava fingið avlop á fíggjarlógini, og Føroyar eru ikki serliga skuldarbundnar sammett við onnur lond í Vesturheiminum. Men vandin lúrir í langtíðarbúskapinum.

Tí mugu vit tillaga barlastina nú.

***

Frú forkvinna.

Í Vektarbúðini í Tinganesi starvaðust sonevndir vektarmenn. Vøran varð løgd á aðra vágskálina, og síðani løgdu vektarmenninir vandaliga lodd fyri lodd sum mótvekt á hina vágskálina.

Í dag er vinnan mótvektin til vælferðartænasturnar. Vóru ikki undangongufólk, sum váðaðu, arbeiddu hart og avroknaðu til landskassan, ja, so fekk samfelagið ikki hildið sínar vælferðarskyldur.

Tí skal vinnan hava góðar karmar og treytir.

Føroyskt vinnulív skal gerast meiri fjøltáttað, kappingin javnari, og smáar og miðalstórar fyritøkur – eitt nú innan fyri KT, bygging og tænastu – skulu fáa betri møguleikar. Partur av mótvektini er, at vit styrkja kappingarførið hjá øllum vinnum.

Lægri lønarskattur fer at gera tað léttari at kappast um arbeiðsmegina.

Vit styrkja eisini kappingarførið við eindini "Export Faroe Islands", ið skal menna útflutningin – og vit hava hækkað játtanina til tónleikaútflutningsstovuna, FMX. Eisini er lógin um afturbering broytt fyri at draga fleiri stórar filmsframleiðslur hendaveg. Háttvirdir harrar sum James Bond og Peter Pan hava prógvað, at Føroyar egna seg væl til film.

Eisini smærri vinnur og íverksetarar kunnu við røttu umstøðunum vaksa. Eitt nú tey, sum framleiða stuttfluttar vørur, og tey, ið gera sterkan løg. Vit broyta rúsdrekkalógina, so at tey kunnu selja sínar vørur úr egnum sølubúðum.

Vit vita, at tað kann vera tungt hjá smáum fyritøkum, um starvsfólk gerast langtíðarsjúk. Tá hava tey rætt til løn í 120 dagar. Frameftir kunnu smá vinnurekandi fáa sjúkraendurgjald úr dagpeningaskipanini.

Tann vinnan, sum veksur skjótast, er uttan iva ferðavinnan. Her er trupult at finna røttu javnvágina, men tað er avgerandi, at vit megna tað.

Ferðavinnuvirksemið skal skipast í samljóði við náttúruna og í samstarvi við fólk á staðnum, sum eisini skulu fáa ágóðan. Samstundis skulu vit tryggja rættin hjá føroyingum til at ferðast ókeypis í náttúruni.

Tað skal gerast við virðing fyri virkseminum hjá teimum, sum varða av jørðini, og atlit skulu takast til náttúru og trygd.

Lógaruppskot um gongd í haga kemur fyri tingið í vetur.

Frú forkvinna.

Landið eigur ikki at krevja nógv av smávinnum, sum sáttliga taka síni fyrstu fet. Ei heldur skulu vit leggja stein oman á byrði, tá ið tað gongur illa í sterku vinnunum.

Eingin ivi er um, at fiski- og alivinnan eru høvuðsvinnur okkara. Tá ið vinnur gerast so mikið sterkar, eiga vit at fáa eitt rímiligt gjald fyri firðir, tilfeingi og tænastur, sum vinnan brúkar.

Landið skal eisini leggja sín part á vágskálina við góðum kørmum og umstøðum.

Vit skulu geva fiskivinnuni karmar til nýskapan og virðisvøkstur.

Hóast tað er trupult, arbeiða vit við at tryggja partrolarunum rættindi á fjarleiðunum, nú upsafiskiskapurin er vánaligur.

Hinvegin er tað hugaligt við rokfiskiskapinum á Føroya Banka, sum kann gerast eitt týdningarmikið íkast hjá línu- og útróðrarbátunum.

Tá ið tað kemur til alingina, er peningur settur av til gransking. Vit vilja vita, hvussu vit basa laksalús, ala á opnum havi, hvussu alingin ávirkar havumhvørvið – og um samband er millum upsastovn og aling.

Saman við vinnuni vilja vit tryggja, at føroysk aling eisini frameftir verður burðardygg og í samljóði við umhvørvið.

***

Tí frú forkvinna: Fortreytin fyri lívi og virksemi í Føroyum er, at vit virka í javnvág við viðbreknu náttúruna og umhvørvið. Henda javnvág er so líðandi skeiklað seinastu árini.

Í eini sjónvarpssending segði virðislønti náttúrugranskarin, Jens Kjeld Jensen, soleiðis: »Mann skuldi trúð, at tey, sum búgva her, eisini vilja hava, at børnini skulu síggja lunda, lomviga og ymsar sjáldsamar plantur. Tað er løgið, at politikararnir ikki vilja lata tað víðari til síni børn og barnabørn.«

Og eg viðgangi: tað tók ov langa tíð. Tað var í tøkum tíma, at ein breiður meiriluti loksins samtykti náttúruverndarlógina í vár. Nú fáa vit vart ávís øki, djórasløg og plantusløg – og lógin verður frameftir dagførd og fjøltáttað.

Náttúrupolitikkur Føroya fer at áleggja landsstýrisfólkum at arbeiða við fyriliti fyri náttúruni.

Leingi hava vit hugsað um veðurlagsbroytingar sum nakað ótøkiligt, sum fer at raka komandi ættarlið. Men nú síggja vit, at hitin – bæði í heiminum og í sjónum – er methøgur. Suðurevropa hevur í summar staðið í ljósum loga, og stór broyting kann koma fyri fugl og fisk um okkara leiðir, tí havið hitnar.

Í heyst leggur nýggja umhvørvismálaráðið fram uppskot um veðurlagslóg, so landsstýrið verður bundið til at minka útlátið. Í vikuni vístu nýggj tøl, at tað, vit gera, munar. Útlátið er minkað. Men tað skal skerjast uppaftur meir.

Í fjør samtykti Løgtingið ein orku- og veðurlagspolitikk, og longu í ár verða 7 av teimum 25 átøkunum framd í verki. Komandi ár arbeiða vit við minst 10 átøkum.

Ein týðandi partur av hesum er skiftið frá olju til varandi orkukeldur. Hetta krevur, at vit leggja orkunýtsluna um, spara orku og útbyggja varandi orku. Í næstum gera vit avtalu við SEV um orkuútbyggingar komandi fimm árini, og nýggj el-veitingarlóg kemur í Løgtingið. Vit hava eisini sett pengar av til, at almennir bygningar kunnu hitast við grønari orku.

***

Burðardyggur politikkur snýr seg eisini um at røkja tað, sum longu er.

Játtanin til at viðlíkahalda landsins bygningar er hækkað í 2023, og hon hækkar aftur í 2024. Eisini eru 10 milliónir settar av til asfaltering í ár, og meira verður sett av komandi árini.

Um ársskiftið kunnu vit koyra til Sandoynna – og til Fámjins og Norður um Fjall komandi ár. Til Dals verður borað ígjøgnum í ár, og vit fyrireika tjørnuvíkartunnilin. Forkanningarnar til suðuroyartunnilin skulu verða lidnar í 2024. Tá taka vit støðu til, hvussu farast skal fram.

Strandferðsluflotin má endurnýggjast, og forarbeiðið til tað er byrjað. Málið er, at skipini verða bygd í Føroyum og nýta grøna orku.

Ynskini um stórar íløgur komandi árini – á ymiskum økjum – eru mong. Alt kann ikki gerast samstundis. Tað hava vit ikki ráð til. Tí mugu vit raðfesta.

***

Frú forkvinna.

Vektarmenninir í Vektarbúðini í Tinganesi høvdu eisini aðrar týðandi uppgávur enn at viga.

Har kundu tey allarveikastu leita sær hjálp, tá ið tey ongan annan møguleika vistu sær.

Og sannleikin er, at okkum øllum stundum tørvar hjálp. Ikki minst, tá ið heilsan bilar.

Men trýstið á sjúkrahúsini veksur støðugt. Vit mugu tí umskipa heilsuøkið. Veita betri og fleiri tilboð kring landið. So nógvar kanningar og viðgerðir sum gjørligt skulu gerast í nærumhvørvinum. Eitt dømi er dialysuviðgerðin í Suðuroy, sum verður klár seinni í ár.

Tríggir kommunulæknar koma afturat, so vit fáa 37 tilsamans, og vit styrkja framhaldandi Læknavaktina.

Vit orða ein yvirskipaðan heilsupolitikk og taka støðu til, hvørji serlæknaøki skulu mennast, hvussu vit nøkta læknatørvin – og hvussu vit kunnu skipa eitt universtetssjúkrahús.

Fleiri landsdemenssamskiparar verða settir.

Frú forkvinna.

Kjarnin í vælferðarsamfelagnum er jú, at vit hjálpast at. »Berið byrðar hvør hjá øðrum« er greiða áminningin í Bíbliuni.

Lagnan býtir ikki út eftir eini fyrimynd um javnvág. Summi fáa tungt at bera. Og tað er menniskjansliga, moralska og politiska skylda okkara at lætta um.

Síðani vit fyri 50 árum síðani tóku okkara egnu við breki, menningartarni og sálarligum avbjóðingum heim úr Danmark, hava vit støðugt roynt at tryggjað betri kor. Eitt framstig verður í januar, tá ið vit fáa eitt brekumboð.

Eitt annað framstig verður fyri børn við downsyndromi. Í mars tosaði kringvarpið við Svannu Dam Joensen. Hon er mamma seks ára gamla Ólav, ið hevur downsyndrom. Hon segði: »Ólavur hevur tørv á nógvari hjálp. Men hann gongur í barnagarði, hann trívist væl, og hann hevur nógvar vinir, tí hann fær ta hjálpina, sum hann hevur brúk fyri. Tað má vera eitt mál, at øll børn við downsyndromi fáa ta somu hjálpina«.

Her eru vit samd. Tað má vera javnvág. Tí verður ein bráðloysn sett í verk, so øll børn við downsyndromi fáa samskiftishjálp. Eisini fyrireika vit aðrar samskiftisloysnir til børn og ung, ið hava hjálp fyri neyðini – og vit styrkja umstøðurnar hjá teknmáli, talulæru og øðrum samskiftisháttum.

“Tann góða tilgongdin”, ið er eitt samstarv um børn við autismu, verður eftirmett og víðkað, og eitt álit um børn og ung við sálarligum trupulleikum er júst handað landsstýrismanninum.

Tað henda støðugt batar. Men eg viðurkenni, at tað – fyri tey, sum bíða – mangan kann tykjast ganga seint.

***

Tí gleðist eg um, at drúgva ójavnvágin við bústaðartilboðum nú verður rættað.

Trý sambýli eru um at vera liðug, og komandi ár fara vit undir tvey afturat – á Argjum og í Miðvági. Rásin í Runavík verður útbygd, so tvífalt so nógv ung sleppa »í læru til lívið«.

Nógvir vardir bústaðir eru dagførdir, og 11 nýggj pláss eru útvegað.

Men avbjóðingarnar á bústaðarmarknaðinum hava ikki einans rakt fólk við serligum tørvi.

Vit eru vorðin væl fleiri í Føroyum. Tað skapar eina ójavnvág millum eftirspurning og útboð, sum trýstir bústaðarprísirnar upp.

Vit gleðast um, at fólk flyta heim. Vit hava stóran tørv á øllum góðum hondum og høvdum.

Men ilt er at finna bústað. Og hjá teimum, sum leiga, er støðan ótrygg.

Vit hava broytt lógina, so at Bústaðir ikki skulu samstarva við privatar íleggjarar. Tað ger tað lættari at fara undir at byggja, og tað minkar kravið um vinnuligt avkast.

Vit fara eisini at loyva kommunum at stovna og reka almannagagnlig bústaðarfeløg saman við Bústøðum. Við hesum kemur væntandi ferð á bústaðarbyggingina kring landið.

Kommunurnar skulu eisini kunna áseta bústaðarskyldu á nýggjum útstykkingum og krevja tænastugjald frá húsaeigarum, sum ikki búgva í kommununi.

Samanlagt fara hesi átøk at geva betri javnvág millum løn og leigu.

***

Frú forkvinna.

Eitt annað, sum setur trýst á bústaðarmarknaðin – men eisini almannaverk og skúlaverk – er, at nógv útlendsk arbeiðsmegi flytur til landið.

Við fast-track skipanini kann vinnan nú lættari fáa neyðuga hjálp frá útlendskari arbeiðsmegi. Men hugsanin var, at tey skuldu arbeiða her og hava sín grundvøll í heimlandinum.

Í seinastuni er talið á familjusamanføringum tó stórliga hækkað, tí tey, sum koma higar at arbeiða, vilja skapa sær og familjuni eitt nýtt lív her. Bara í fjør fluttu 78 børn til Føroya gjøgnum skipanina við familjusamanføring.

Útlendingalógin er gomul – og tað hevur skund at nútímansgera hana, tí hon skapar ójavnvág í okkara lítla samfelagi.

Okkum tørvar arbeiðsmegi, og útlendingar veita eitt virðismikið íkast til okkara samfelag. Men vit noyðast at tryggja javnvágina millum rættindi og skyldur teirra, so vit ikki missa tamarhaldið.

Hesi viðurskifti skulu fáast í javnvág sum skjótast.

Tí skal Útlendingastovan kunna avgreiða arbeiðsloyvi í Føroyum, og útlendskir arbeiðstakarar skulu kunna uppihalda familjuni, søkja teir um familjusamanføring.

Vit mugu samstundis gera okkara til, at tilflytarar falla til í Føroyum. Tí kemur nýggj integratiónslóg í vár.

***

Frú forkvinna.

Fyri fáum døgum síðani bórust tíðindini um, at pedofilar hava forbrotið seg móti børnum á netinum. At teir ígjøgnum sosialar miðlar gykla og tøla – og síðani á grovasta hátt bróta álitið, óseku børnini sýna teimum. Hetta er menniskjansliga og moralskt forkastiligt.

Landsstýrið tekur hetta í størsta álvara, og longu í heyst verður tað revsivert at byggja upp samband við børn við tí fyri eyga seinni at fremja kynsligan ágang.

Tí frú forkvinna,

Føroyar skulu vera heimsins besta barnaland.

Tíverri hava nógvar føroyskar barnafamiljur seinastu árini upplivað fakbólkar, sum ikki tosa saman. Stovnar, sum ikki samstarva. Ráð, sum vísa til hvørt annað. Tað hevur verið ørkymlandi.

Tí hevur samgongan raðfest eitt barna- og útbúgvingarmálaráð. Tað minkar um vandan fyri, at børn og ung detta niðurímillum, nú sama ráð fylgir teimum frá vøggu til vaksnamannalív.

Ein av avbjóðingunum er ójavnvágin á dagstovnaøkinum. Okkum tørvar námsfrøðingar, og nú játtanin er hækkað, kunnu tvífalt so nógv lesa námsfrøði. Vit gera eisini eina heildarætlan fyri dagstovnaøkið og endurskoða dagstovnalógina saman við kommununum.

Í fólkaskúlanum verða eisini broytingar. Vit stytta skúladagin, styrkja tvílæraraskipanina og leiklutin hjá flokslæraranum – og tryggja betri javnvág millum lærugreinarnar. Færri næmingar skulu vera í flokkunum, so lærarin fær betri tíð til hvønn einstakan.

Í heyst verður aðalorðaskifti um fólkaskúlan.

Eisini arbeiða vit við ískoytisútbúgvingum, sum tryggja upptøku á Heilsuskúla Føroya, og vit vilja veita heilsuhjálparum løn undir útbúgving, so betri javnvág fæst millum útbúgving og familjulív.

Í miðnámsskúlanum skal bera til at fáa sveinabræv og samstundis miðnámsprógv, sum ger tað gjørligt at lesa víðari.

Sum nakað nýtt kemur ein royndarskipan fyri miðnámsskúlanæmingar, ið íðka úrvalsítrótt, so tey kunnu taka eina miðnámsútbúgving eftir vanligari tíð.

***

Tí frú forkvinna.

Tað gongur heilt ómetaliga væl í føroyskum ítrótti. Evni og avrik viga væl upp ímóti útlendsku kappingarneytunum.

Játtanin til ÍSF er hækkað 2 milliónir. Komandi árini hækkar hon meira.

Í stórt sæð øllum ítróttagreinum er framgongd, og vit standa okkum væl á Oyggjaleikum, Special Olympics og til NM, EM og HM.

Tað verður ein stórhending, tá ið hondbóltsmenninir í januar spæla EM-endaspæl. Tað er eisini stórt, at Oyggjaleikir koma aftur til Føroya – og vit síggja aftur úrmælingar miða ímóti OL.

Ein, sum droymir um OL, er Jónas Isaksen, sum íðkar frælsan ítrótt. Hann er eitt av okkara størstu stjørnuskotum, og á oyggjaleikum staðfesti venjarin, at Jónas hevur eina framúr góða javnvág millum úthaldni og skjótleika. Sjálvur segði Jónas: »OL er mítt hægsta mál. OL fyri Føroyar.«

Landsstýrið og ÍSF arbeiða fyri, at føroyingar skulu kunna kappast undir Merkinum heldur enn Dannebrog.

***

Frú forkvinna.

At hava eina sunna sál í einum sunnum likami. Tað er besta javnvágin, sum menniskjað kann vera í.

Meðan ítrótturin tryggjar, at likamið er sunt – so tryggja mentan og list, at sálin er sunn.

Á hesum økinum er samgongan samd: listin skal ikki stýrast, men styrkjast.

Tí er Føroya Symfoniorkestur, sum í ár fyllir 40, styrkt við hægri játtan.

Og tí eru fýra milliónir settar av til at fyrireika Tjóðleikhús Føroya. Næsta stigið er at fáa fíggingina upp á pláss – ta føroysku eins væl og ta útlendsku.

Tjóðleikhúsið fer at styrkja leiklistina – og at gagna eitt nú ritlist, tónlist og dansi. Tað fer eisini at hava málsligan týdning. Nú enska málið við føstum fetum trokar seg inn og koppar málsligu javnvágini, mugu vit leggja alla mótvekt í.

Føroyskt skal inn á talgildar pallar, og útboðið av føroyskum barna- og ungdómstilfari skal fleirfaldast. Vit stuðla somuleiðis eini røð av átøkum, sum styrkja føroyska málið.

***

Frú forkvinna.

»Føroya mál á manna tungu merkir: her býr Føroya fólk« syngja vit.

Men hvat merkir tað, at vit eru Føroya fólk? Hvørji eru vit? Hvørji vilja vit vera?

Politikkur snýr seg um, hvat vit frameftir skulu gera. Og tað, vit gera, avdúkar, hvørji vit eru.

Fyri meg snýr svarið seg um javnvágina millum tað menniskjasliga, moralska og búskaparliga.

Í nógvum málum eru vit eisini samd.

Eitt nú, tá ið Løgtingið einmælt samtykti at taka ímóti 200 ukrainskum flóttafólkum.

Eisini var løgtingið í vár samt um at lata 7 milliónir í neyðhjálp til Ukraina – størsta einstaka upphædd, sum Føroyar nakrantíð hava latið. Komandi ár fær Ukraina minst 10 milliónir.

Men ein stórur spurningur fylgir við flóttafólkunum úr Ukraina.

Hvussu skulu vit fyrihalda okkum til Russland, sum hevur gjørt hesi fólkini til flóttafólk? Sum hevur bumbað fleiri býir í Ukraina til skerv og dripið túsundavís? Sum hevur skeiklað javnvágina í Evropa?

Er tað menniskjansligt og moralskt rætt at samstarva við eitt land, ið fremur slíkar illgerðir og brýtur bæði fólkarætt og altjóða lóg?

Landsstýrið vigar í løtuni samstarv okkara við Russland. Í heyst verður greitt, hvat skal henda í 2024.

Sama hvør avgerðin verður, kann hon ikki bara grundast á búskaparlig atlit. Tað, sum kann tykjast skynsamt í dag, nýtist ikki vera tað besta í longdini. Javnvágin kann skjótt skifta. Vit mugu eisini hava moralsk og menniskjanslig atlit við.

Frú forkvinna – tað mugu vit altíð.

Eisini í støðu okkara í heiminum sum heild. Vit skulu taka ábyrgd.

Javnvág er tó ikki millum tað, vit vilja, og tað, vit hava heimild til á uttanríkispolitiska økinum. Hetta skal broytast.

Í heyst leggja vit uppskot fram um føroyskan trygdar- og verjupolitikk. Avgerðir á hesum økjum skulu ongantíð takast uttan um okkum. Tí tað er okkum, tað snýr seg um.

Politikkurin skal byggja á, at Føroyar eru partur av vesturheiminum og samstarva við NATO. Eg heiti á Løgtingið um at standa saman.

Vit vilja eisini taka størri ábyrgd í sambandi okkara við Danmark. Føroyingar eru ríkari fyri hvønn íbúgva enn danir. Tað er tí eisini ábyrgdarfult at niðurlaga ríkisveitingina. Men vit gera tað skynsamt við 25 milliónum um árið.

Tað var somuleiðis at sýna ábyrgd, tá ið Løgtingið einmælt yvirtók vitaverk, sjóuppmerking og farsóttarøki. Í næstum yvirtaka vit loftrúmið og sjórættin.

***

Frú forkvinna.

Sambært Sprotanum merkir orðið »javnvág«, at tveir lutir viga tað sama. Hetta var aðalmálið í Vektarbúðini – og í politikki eiga vit eisini støðugt at leita eftir røttu javnvágini.

Millum inntøkur og útreiðslur. Millum vinnuligan framburð og náttúruvernd. Millum menniskjanslig og búskaparlig atlit.

Skeiklast javnvágin á einum øki, skeiklast hon á øðrum økjum við. Skeiklast hon ov nógv, fer samfelagið av lagi.

Javnvágin er tó aldrin fullkomin, tí viðurskiftini broytast alla tíðina.

Sum Trygvi Danielsen yrkir:

*Alt aldar*
*alsamt*
*ójavnt*

Tí mugu vit – eins og vektarmenninir – støðugt leggja lodd á og taka lodd av fyri at tryggja rætta mótvekt. Eg eri bjartskygdur um, at gerðir og avgerðir okkara geva betri javnvág.

Búskaparliga, menniskjansliga og moralskt. Tað, vit gera, avdúkar jú, hvørji vit eru.

Góða ólavsøku, øll somul.

Gud signi Føroyar.

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNARMÁL

**Yvirtøkur**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at fremja fleiri yvirtøkur komandi árini. Í vár samtyktið Løgtingið at yvirtaka farsóttarøkið, ið verður yvirtikið frá 1. januar 2024. Somuleiðis hevur Løgtingið samtykt at yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk frá 1. juni 2024.

Komandi tingsetu er ætlanin at leggja fyri tingið uppskot um at yvirtaka sjórættin frá 1. januar 2025 at rokna. Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at dagføra sjólógina soleiðis, at lógin er dagførd áðrenn ætlaðu yvirtøkuna í 2025. Somuleiðis er ætlanin at leggja uppskot fyri tingið í vár um at yvirtaka málsøkið flogferðsla – eftirlit við loftrúminum. Ætlanin er, at málsøkið verður yvirtikið frá 1. januar 2026 at rokna. Harumframt arbeiðir landsstýrið við at fyrireika møguliga yvirtøku av Landslæknaembætinum.

**Sjóhitaskipan fyri Tinganes**
Løgmansskrivstovan hevur síðan 2022 saman við Betri Trygging, Landsverki og uttanhýsis ráðgevum fyrireikað eina sjóhitaskipan, soleiðis at teir 22 bygningarnir hjá landinum í Tinganesi og aðrir bygningar í økinum verða hitaðir við sjóhita. Verkætlanin verður mett at kosta tilsamans umleið 10 mió. kr., harav landið skal rinda sín lutfalsliga part. Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis. Fyrsta stig er at seta á stovn eitt hitafelag, sum luttakandi partarnir skulu eiga í felag, og sum skal standa fyri felagsíløguni í sjógvinntak, pumpuskipan og infrakervi o.a. Arbeiðið verður væntandi boðið út í ár, og vónandi kann skipanin takast í nýtslu komandi ár.

At leggja um frá upphiting við olju til sjógvhita er partur av grøna orkuskiftinum í Føroyum, har landið sjálvsagt eigur at ganga undan og vera ein virkin partur. Harumframt væntast umleggingin at spara landinum nakrar hundrað túsund krónur árliga, alt eftir hvussu høgir oljuprísirnir verða frameftir, soleiðis at íløgan verður vunnin inn aftur eftir ávíst áramál.

**Suðuroyartunnilin**
Samgongan hevur sett sær fyri, at allar neyðugar kanningar í sambandi við ein undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna verða lidnar við ársenda í 2024. Løgtingið samtykti í undanfarnu tingsetu at heimila landsstýrinum ókeypis at avhenda alt viðkomandi tilfar til P/F Suðuroyartunnilin, sum skal standa fyri at gera fyrireikingar lidnar. Arbeiðið er í gongd og verður væntandi liðugt næsta ár. Í hesum sambandi hevur løgmaður heitt á politisku flokkarnar í Løgtinginum um at velja umboð í ein politiskan fylgibólk til tess at tryggja, at arbeiðið er væl kjølfest, og at allir flokkarnir hava neyðuga innlitið og møguleika at koma til orðanna.

**Søla av partabrøvum P/F Smyril-Line**
Løgtingið hevur við fíggjarlógini fyri 2023 givið heimild at selja landsins partabrøv í P/F Smyril-Line. Løgmansskrivstovan hevur boðið út uppgávuna at ráðgeva og skipa fyri søluni av ognarlutinum hjá landinum í P/F Smyril-Line. Miðað verður eftir at avgreiða søluna í hesum árinum.

## FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

### Føroyski búskapurin

Útgangsstøðið hjá føroyska búskapinum er gott, og búskapurin er væl fyri at handfara eitt møguligt tíðarskeið við minni vøkstri, prísvøkstri og halli hjá landskassanum. Tað almenna í Føroyum er ikki serliga skuldarbundið, um sammett verður við onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 15% av BTÚ, og bruttoskuldin hjá kommunum er um 1,5 mia. kr. ella 5-6% av BTÚ. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur um 2,6 mia. kr. í skuld ella um 10% av BTÚ; landið hevur latið ferðsluveðhald til felagið. Hetta gevur tilsamans 30-35% av BTÚ í almennari bruttoskuld, sum er áleið tað sama sum almenna skuldin í Danmark. Men føroyska samfelagið hevur stórar búskaparligar avbjóðingar, tá ið hugsað verður um afturvendandi sveiggini í búskapinum, ið stava frá okkara tilfeingisvinnum og vantandi haldføri í almenna búskapinum. Neyðugt er tí at stýra við skynsemi, skulu Føroyar koma væl gjøgnum avbjóðingarnar, uttan at vælferðin verður sett í vanda.

### Broytingar í veiðigjaldslógini samtyktar

Samgongan setti sær fyri, at tilfeingisgjøldini í uppisjóvarvinnuni og flotanum í Barentshavinum skuldu endurskoðast, soleiðis at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, fellur til landið. Veiðigjøldini í áður galdandi lóggávu vórðu ásett soleiðis, at samlaða veiðigjaldsinntøkan skuldi svara til inntøkuna í 2018. Við broytingunum hevur samgongan betrað um skipanina við at stilla avgjaldsstigarnar og gera skipanina javnari og gjøgnumskygdari.

### Serskipan fyri elbilar longd

Sum part av veðurlagspolitikkinum hevur Løgtingið samtykt at skrásetingargjald skal ikki gjaldast fyri el- og vetnisakfør í 2023 og 2024. Frá 2025 verður skrásetingargjaldið stigvíst sett í gildi aftur. Skipanin við afturbering av meirvirðisgjaldinum er eisini longd. Tað hevur við sær, at keyparar av elbilum komandi tvey árini fáa upp til 70.000 krónur av meirvirðisgjaldinum á bilinum afturrindað. Frá 2025 verður afturberingin av meirvirðisgjaldinum stigvíst minkað og fellur burtur í 2028. Afturberingin av meirvirðisgjaldi fyri plug-in hybridbilar heldur bert fram til 1. september í ár, tá ið skrásetingargjaldið á teir bilarnar og vanligar hybridbilar eisini hækkar upp í ávikavist 50% og 75%.

### Føroyar fingið talgilt koyrikort og samleikakort

Føroyar hava fingið sítt fyrsta talgilda koyrikort. Nýggja appin, Skjáttan, varð alment tikin í nýtslu í apríl 2023. Í appini eru talgilt koyrikort og samleikakort. Við nýggju appini á telefonini kunnu fólk nú altíð hava koyrikort og samleikakort við hondina. Hvørt ár fáa fleiri bilførarar bót, tí teir ikki hava koyrikortið uppi á sær. Nú er nóg mikið at hava koyrikortið á telefonini. Fyribils er talgilda koyrikortið bert galdandi í Føroyum, men arbeitt verður við, at tað skal kunna brúkast í øðrum londum. Talgildu Føroyar hava ment Skjáttuna í samstarvi við Akstovuna, Føroya Stiftsstjórn, Strandfaraskip landsins og 10 kommunur í Føroyum.

**Sáttmálasamráðingar**
Tann 1. oktober 2022 fóru 19 sáttmálar hjá Fíggjarmálaráðnum úr gildi. Tey størstu av feløgunum eru Føroya Lærarafelag, Akademikarafelag Føroya, Felag Tænastumanna Landsins, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Yrkisfelag Miðnám. Tann 1. januar 2023 gingu tríggir sáttmálar við fakfeløg á heilsuøkinum út, harímillum við sjúkrarøktarfrøðingar. Tann 1. februar 2023 gekk sáttmálin við Serlæknafelagið út, og tann 1. apríl 2023 gekk sáttmálin við Pedagogfelagið út. Fyri hesar sáttmálar, sum eru gingnir út, er samanlagt talan um eina lønarupphædd upp á góðar 2 mia. kr. ella 71% av samlaðu almennu lønarútgjaldingunum.

Á privata arbeiðsmarknaðinum eru fleiri sáttmálar gjørdir seinasta árið. Tilsaman varð karmurin fyri eitt tvey ára sáttmálaskeiðið 7,84%; fyrra árið 3,80%, og seinna árið 4,04%. Vanligt er, at tá ið vinnan, sum er í altjóða kapping, hevur lagt seg á ein lønarkarm, so heldur landsstýrið seg til sama lønarkarmin, og tað er eisini tað, sum landsstýrið hevur boðað frá alment.

Fyrsta semjan í hesum samráðingarumfarinum varð gjørd 15. mai 2023 við Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara, og 20 juni varð semja gjørd við Heilsurøktarafelagið. Semjurnar halda seg til ætlaða lønarkarmin.

**BTÚ í føstum prísum**
Hagstovan hevur á fyrsta sinni gjørt upp høvuðstølini í tjóðarroknskapinum í føstum prísum. Sostatt ber til at máta realvøksturin í føroyska búskapinum og sammeta hann við gongdina í búskapinum í øðrum londum frá 2009 til 2021. Nú bruttotjóðarúrtøkan er gjørd upp í føstum prísum, ber til at máta, um mongdin av framleiddum vørum og tænastum veksur ella minkar, sama hvussu prísgongdin er. Mátið fyri realan búskaparvøkstur er árliga broytingin í bruttotjóðarúrtøkuni í føstum prísum. Í tíðarskeiðinum 2008 til 2021 var reali búskaparvøksturin í Føroyum í miðal 2,6 prosent. Reali búskaparvøksturin hevur verið størri enn í fleiri øðrum londum. Sama tíðarskeið var miðal realvøksturin fyri OECD-londini 1,5 prosent. Miðal búskaparvøksturin í Danmark og Íslandi var ávikavist 1,2 og 1,4 prosent árini 2008 til 2021.

## Átøk komandi tingár

**Búskapurin**
Príshækkingarnar, sum millum annað eru komnar orsakað av krígnum í Ukraina, hava stóra óvissu við sær og koma afturat afturvendandi avbjóðingunum við sveiggjum í fiskaprísum, nøgdum og oljuprísum. Tí er umráðandi, at stýrt verður við skili í hesum tíðum. Neyðugt er eisini at gera tillagingar í almenna geiranum fyri framhaldandi at tryggja øllum føroyingum vælferð. Stóra uppgávan komandi ár verður at fáa Føroyar trygt ígjøgnum tíðina, sum kemur við stórari óvissu orsakað av kríggi í Evropa, rentuhækkingum og stórum prísvøkstri.

**Tryggja langtíðarhaldførið – styrkt fíggjarpolitiskt regluverk**
Framskrivingar hjá Fíggjarmálaráðnum í játtanarkørmunum fyri 2024 vístu, at fíggjarlógin fyri 2024 fór at geva hall, um ikki fíggjarpolitisk átøk vórðu sett í verk til tess at styrkja inntøkugrundarlagið og at tálma útreiðsluvøkstrinum. Við átøkunum, sum nú eru samtykt, umframt nýggjum átøkunum, verður sannlíkt avlop í 2024. Tað eru serliga útreiðslurnar í almanna- og heilsugeiranum, sum fara at vaksa komandi árini. Tað kemst serliga av broyttu fólkasamansetingini, sum hevur við sær, at talið á eldri borgarum veksur skjótari enn talið á fólki í arbeiðsførum aldri.

Fyri at venda framskrivaða hallið til avlop er neyðugt at fremja átøk, sum tálma útreiðslunum og økja um inntøkurnar næstu árini. Avlopini kunnu bæði brúkast til at minka landskassaskuldina og at standa ímóti við í búskaparliga verri tíðum. Landsstýrið fer at hyggja nærri at almenna geiranum við tí fyri eyga at fremja tillagingar, ið kunnu betra almenna raksturin frameftir. Eisini fer landsstýrið at gera uppskot til eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum skal vera við til at tryggja haldførið og vælferðina í framtíðini.

**Tillaga skattastigan**
Ætlanin er at broyta skattastigan, so at fleiri fara at rinda minni í skatti. Tað kann eggja fólki til at arbeiða meira. Hóast prísvøkstur og inntøkuvøkstur hevur skattastigin verið óbroyttur seinastu átta árini. Tað hevur við sær, at í dag rindar ein stór fjøld av vanligum løntakarum høgan marginalskatt. Til dømis rindar ein vanligur sjúkrarøktarfrøðingur, sum arbeiðir niðursetta tíð, meira enn helvtina av inntøkuni í skatti fyri hvørja eyka vakt. Tað skal broytast soleiðis, at størri áhugi verður at arbeiða meira.

**Umskipa almenna bygnaðin**
Samgongan heldur tað vera umráðandi at fáa kannað, um almenni geirin í Føroyum virkar nóg væl sammett við onnur lond. Tað inniber m.a. at kanna, um almennu skipanirnar í Føroyum eru hóskandi til støddina á samfelagnum, ella um tað eru ov stórar og kostnaðarmiklar skipanir, sum hóska betur í størri londum. Arbeiðið snýr seg eisini um at kanna, um tað ber til at fáa størri fyrimunir av stórrakstri í almenna geiranum, um almennar tænastur og stovnar kunnu verða skipað øðrvísi og møguliga í størri eindum. Endamálið er at kunna veita somu ella betri tænastur fyri minni ella somu útreiðslur. Politiska skipanin, landsstýrið og myndugleikar hava skyldu til javnan at kanna, um tað ber til at reka almenna geiran fyri minni útreiðslur. Arbeiðið verður væntandi skipað við fleiri slóðum og við íblástri frá líknandi arbeiði í okkara grannalondum.

**Lønarlyft til starvsfólk á umsorganarøkinum**
Samgongan vil geva lægst løntu bólkunum á umsorganarøkinum eitt lønarlyft. Námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar við og uttan útbúgving verða fevnd av lønarlyftinum. Talan er um bólkar, sum starvast á eldra-, dagstovna- og almannaøkinum, har trupult er at nøkta starvsfólkatørvin. Lønarlyftið kemur oman á lønarkarmin og er ikki partur av lønarsamráðingunum annars. Nógv tann størsti parturin av hesum bólkum eru í starvi á kommunala økinum.

Sum endurgjald fyri kostnaðin av lønarlyftinum hjá kommununum verður gjørd ein broyting í fíggingini av skattafrádráttinum hjá pensjónistum. Tøka inntøkan hjá pensjónistunum verður óbroytt. Fíggingarleisturin fylgir vaksandi talinum av pensjónistum og ger sostatt, at samsvar er ímillum fígging og fíggingartørv.

**Útveiting av almennum uppgávum**
Har tað er møguligt og skynsamt, skal privata vinnan hava møguleika at bjóða upp á almennar tænastur. Treytin er, at tað fíggjarliga og tænastuliga er betri fyri brúkaran og landið. Í komandi tingsetu er ætlanin at orða ein útveitingarpolitikk.

**Styrkt eftirlit við innflutningi av rúsevnum**
Sambært heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu skulu átøk fremjast komandi árini, sum væntandi fara at bøta um eftirlitið við innflutninginum til landið so, at tað verður torførari at flyta rúsevni inn í landið. Ætlanin er at fáa eina profileringsskipan, so at marknaðareftirlitið verður munadyggari og beinraknari. Tørvur er eisini á at dagføra skannararnar hjá TAKS. Í sambandi við komandi dagføring og útbygging av flogvøllinum í Vágum og terminalinum hjá Smyril Line í Tórshavnar havn er ætlanin at fáa betri eftirlitsumstøður til tollararnar hjá TAKS.

**Talgildu Føroyar**
Samgongan hevur sett sær sum mál, at kunningar- og samskiftisvinnan skal stimbrast. Ein týðandi partur av at stimbra føroyska kt-vinnu er Talgildu Føroyar.

**Virkisskráin**
Arbeitt verður í løtuni við at menna eina talgilda virkisskrá, sum eftir ætlan skal vera liðug í ár.

**Skúlanet**
Gjaldstovan og Undirvísingarstýrið arbeiða við einari ætlan um eitt skúlanet fyri skúlar undir landinum og kommununum. Skúlanet er skipað sum samstarv millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunur, skúlar, útbúgvingarstovnar og Gjaldstovuna, sum umsitur Landsnet. Roknað verður við, at tað fer at taka tvey ár at verkseta Skúlanet liðugt.

## FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁL

### <u>Fiskivinnumál</u>

**Brúksskylda**
Tillagingar verða gjørdar í verandi reglum í sjófeingislógini, sum áseta brúkstreyt fyri at avhenda veiðirættindi, og í reglunum um generellu brúksskylduna á veiðiloyvi og fiskiloyvi, so tær endurspegla dagsins tørv og eru neyvari og greiðari fyri loyvishavarar og umsiting. Lógaruppskotið verður lagt fram fyri at broyta og tillaga ásetingarnar um brúksskyldu, sum komu í gildi á nýggjárinum.

**Virðisvøkstur í fiskivinnuni**

Fyrr í summar varð skipað fyri ráðstevnu um virðisvøkstur í fiskivinnuni. Ráðstevnan er ein liður í tí ætlan, ið landsstýrið hevur fest í samgonguskjalið um at eggja vinnuni at nýskapa, virðisøkja og meirvirka tilfeingið. Nú verður sjøtul settur á arbeiðið at seta í verk átøk, sum stimbra møguleikarnar at fáa hjávørur til lands og harnæst virka tær til hávirðisvørur. Ein týðandi liður í virðisøking er spurningurin um góðsku á rávøruni. Ætlanin er at lýsa henda spurningin nærri og staðfesta, um skipanir á økinum skulu dagførast.

**Fiskiskapur á Føroyabanka**

Føroyabanki var í nógv ár friðaður fyri nærum allari veiðu. Í 2022 var varisliga latið upp fyri vinnuligum fiskiskapi. Og í 2023 er eisini ein serskipan sett í verk fyri fiskiskap á Føroyabanka. Eftir skipanini kunnu línuskip og útróðrarbátar royna á Bankanum í avmarkað dagatal. Skipanin er nakað broytt sammett við 2022. Útróðrarbátarnir fáa lutfalsliga fleiri fiskidagar, og línuskipini fáa lutfalsliga færri dagar. Harafturat er skipanin hjá útróðrarbátunum undir 15 tons broytt soleiðis, at bátarnir fiska undir eini skipan við felags fiskidøgum við hámarki fyri hvønn bátin.

**Eftirmeting av umsitingarætlanini**

Síðan 2021 hevur fiskidagatalið undir Føroyum verið ásett eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu. Endamálið er at stuðla undir burðardyggan fiskiskap eftir toski, hýsu og upsa, og at vinnan í rímiliga tíð frameftir veit, hvørjir fiskimøguleikarnir vera. Umsitingarætlanin og veiðireglan skal eftirmetast í 2023, áðrenn fiskidagar verða ásettir fyri fiskiárið 2024. Farið er undir at fyrireika hesa eftirmeting. Arbeiðið verður skipað í einum bólki við umboðum fyri veiðibólkar í fiskidagaskipanini og við fólki frá Havstovuni, Vørn og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

**Fiskiveiðisamráðingar**

Stórar avbjóðingar hava verið seinastu árini við samráðingunum millum strandarlondini um svartkjaft, norðhavssild og makrel. Nú londini hava dagførdar vísindaligar útbreiðslufrágreiðingar um allar tríggjar stovnarnar, eru aftur ítøkiligar samráðingar millum londini um at býta stovnarnar.

Í 2023 hava Føroyar undirritað fiskiveiðiavtalu við Bretland, Grønland, Ísland, Noreg og Russland. Harumframt hava Føroyar eisini veiðirættindi í NAFO-øki, í NEAFC-øki og í SPRFMO-øki.

Síðan Bretland fór úr ES og gjørdist sjálvstøðugt strandarland, hevur ikki eydnast at finna semju um fiskivinnusamstarv ímillum Føroyar og ES, ið báðir partar kunnu góðtaka. Føroyar og ES hava tó umrøtt støðuna, og vilji tykist at vera frá báðum síðum at byrja samstarvið av nýggjum.

Í oktober 2022 undirritaðu Føroyar og Ísland ein karmsáttmála, sum skal liggja til grund fyri tvíliðaða fiskiveiðisamstarvinum millum londini frameftir. Karmsáttmálin varð samtyktur í Løgtinginum í mai í ár. Fiskiveiðiavtalan millum Føroyar og Ísland fyri 2023 var sostatt tann seinasta, sum er samtykt á ráðharrastigi. Frameftir verða tað sendinevndir á embætisstigi, sum fara at samráðast um sínámillum fiskiveiðiavtaluna, eins og mannagongdin er í fiskiveiðisamráðingum við onnur lond.

Í 2022 samdust Føroyar og Grønland um at fara undir at dagføra karmsáttmálan millum londini, sum er frá 1997. Avrátt er at hava fundir hesum viðvíkjandi í 2023. Fundirnir verða í tann mun tað er gjørligt, á talgildum palli.

Fiskiveiðisamstarvið við Russland hevur fingið drúgva umrøðu í 2023. Tíðliga í 2023 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at lýsa ymisk viðkomandi atlit viðvíkjandi samstarvinum við Russland, harundir fiskiveiðisamstarvinum. Landsstýrið fer í heyst at taka støðu til fiskiveiðisamstarvið við Russland fyri 2024.

**Gransking og fiskivinnuroyndir**

Gransking og menning innan fyri veiðu og matvøruframleiðslu hevur stóran týdning fyri kappingarførið hjá fiskivinnuni. Ítøkiligar kvotur eru latnar innan fyri skipanirnar “vinnuligar fiskiroyndir” og “vinnuligar royndir og verkætlanir”. Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið fylgir hesum ætlanum, har nýggjastu royndirnar fevna um fiskiskap eftir reyðæti og tunfiski. Aðrar ætlanir fevna um meirgóðsking av tilfeingi eins og nýmenning á tøkniliga økinum.

Botnfiskastovnarnir á landgrunninum eru sera illa fyri og hava alla vernd fyri neyðini. Tí er neyðugt, at gransking um fiskastovnar, havumhvørvi og fiskiskap á og kring landgrunnin verður uppraðfest, so at vit betur skilja, hvussu vistskipanirnar virka og samvirka, harundir eisini, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka vistskipanirnar. Eisini er av týdningi at kanna, hvørja ávirkan laksaaling hevur á upsa og á vistskipanina á føroyska landgrunninum sum heild.

**Hvala- og grindamál**

Hvalateljingar verða aftur í Norðuratlantshavi í 2024. NAMMCO skipar fyri hesum hvalateljingeum, og tær eru regluliga umleið 5.-7. hvørt ár. Seinastu teljingarnar vóru í 2015. Føroyar luttaka við granskarum og skipi, og Havstovan samskipar føroysku luttøkuna. Hvalateljingar eru grundarlagið undir vísindaliga arbeiðinum við stovnsmeting av grind og øðrum hvalasløgum.

Í 2022 varð ein fyribils kvotuáseting gjørd fyri at gagnnýta springarar. Loyvt er at taka 500 springarar um árið, og hetta er galdandi í tvey ár. Frá 2024 verður veiðan ásett eftir tilmæli frá NAMMCO um burðardygga veiðu.

**Fiskiveiðieftirlit**

Vørn hevur eftirlit við føroyskum og útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi, og við føroyskum fiskiskipum, sum fiska uttan fyri føroyskan sjógv. Vørn hevur somuleiðis eftirlit í føroyskum havnum við landingum og umskipingum.

Í 2023 er játtanin til Vørn og fiskiveiðieftirlit hækkað tvær milliónir krónur. Størri játtan styrkir fiskiveiðieftirlitið. Tað gevur rúmari møguleikar at brúka eygleiðarar umborð á fiskiskipum, sum royna í føroyskum sjógvi, og betrar eftirlitið við umskipingum og landingum í føroyskum havnum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa til vega eitt nýggjari skip fyri “Tjaldrið”, ið er gamalt og ótíðarhóskandi. Arbeitt verður við at fyrireika málið.

**Veðurtænasta**
Veðurstova Føroya varð sett á stovn í 2021 og hevur síðan verið í støðugari menning. Veðurtíðindi verða nú miðlað út bæði í útvarpi og sjónvarpi, og tað er stórt framstig at fáa føroysk veðurtíðindi í føroysku miðlunum. Enn er tó nakað eftir á mál. DMI ger framvegis veðurforsagnirnar um vikuskiftið og eftir arbeiðstíð. Miðað verður eftir at yvirtaka størsta partin av hesum arbeiðinum. Somuleiðis verður arbeitt støðugt við at betra um tænastuna, mátiskipanina og undirstøðukervið og at økja um starvsfólkaorkuna. Sum frá líður kann virksemið hjá Veðurstovu Føroya eisini gerast partur av gransking um veðurlagsøkið. Í løtuni starvast sjey fólk á veðurstovuni, harav onkur hálva tíð.

## Samferðslumál

**Landsins bygningar**
Tað er ikki bert tørvur á at byggja nýtt. Neyðugt er eisini at styrkja viðlíkahaldið av teimum bygningum, sum landið longu eigur. Landsstýrið vil tí raðfesta viðlíkahald av landsins bygningum fremri. Játtanin til at halda og umvæla landsins bygningar er hækkað úr 22 upp í 27 mió. kr. í 2023, og verður eftir ætlan eisini hækkað í 2024.

**Grønar orkuloysnir**
Meginparturin av landsins bygningum verða í dag hitaðir við olju, og orkunýtslan er ov stór. Skulu vit fremja grøna orkuskiftið, er neyðugt, at landið gongur undan. Ætlanini er tí, at bygningar hjá landinum í størri mun skulu skifta yvir til varandi orku. 5 mió. kr. eru játtaðar til grønar orkuloysnir, og ein ætlan verður gjørd fyri økið.

**Samferðsluætlan fyri 2024–2036**
Verandi samferðsluætlan er fyri tíðarskeiðið 2018-2023. Arbeitt verður nú við at dagføra samferðsluætlanina, sum verður fyri tíðarskeiðið 2024-2036. Endamálið er, at politiska skipanin skal hava gott fakligt grundarlag fyri at kunna taka støðu til, hvørjar íløgur skulu gerast næstu árini.

**Asfaltering**
Ein partur av vegakervinum er ikki í nóg góðum standi. Asfaltering av landsvegum verður raðfest fremri, og 10 mió. kr. eru játtaðar til asfaltering í 2023 og eftir ætlan eisini næstu árini.

**Tunlar Norður um Fjall**
Arbeiðið við at gera tunlarnar Norður um Fjall gongur skjótt og væl. Verkætlanin er mett at verða liðug í 2024.

**Fámjinstunnilin**
Farið varð undir at bora Fámjinstunnilin í 2022. Sum væntað er talan um eina avbjóðandi tunnilsverkætlan. Gongur sum ætlað, verður nýggja farleiðin liðug á heysti 2024.

**Tunnil til Dals**
Farið varð undir verkætlanina á vári 2019. Borað verður ígjøgnum tað seinasta í 2023. Nær verkætlanin verður endaliga liðug veldst um, hvussu nógv verður játtað til endamálið.

**Farleið til Tjørnuvíkar**
Ein partur av játtanini til tjørnuvíkarfarleiðina verður brúkt til at fyrireika tunnil til Tjørnuvíkar. Fyrireikingararbeiðið er farið ígongd.

**Uttari ringvegur í Tórshavn**
Endamálið við uttara ringvegi í Tórshavn er at leiga ferðsluna uttan um Havnina og inn til býin við íbindingum, og at betra ferðsluviðurskiftini, framkomuleika og flytiføri fyri alt landið. Vegurin er kommunalur, og landið stuðlar verkætlanini. Arbeiðið er byrjað og verður gjørt komandi árini.

**Fjøruvegurin í Runavík**
Sambært heimildarlóg stuðlar landið verkætlanini nýggjur Fjøruvegur í Runavík við í mesta lagi 55 mió. kr. Arbeiðið er byrjað og verður gjørt komandi árini.

**Endurnýggjan av strandferðsluflotanum**
Ein av raðfestingunum hjá landsstýrinum er, at strandferðsluflotin skal endurnýggjast sum skjótast. Farið er undir at gera forkanningar, skitsur og aðrar fyrireikingar. Síðan verður farið undir at prosjektera. Um nóg stór játtan fæst til endamálið, verður arbeiðið boðið út, og síðan kann nýbyggingin byrja í stigum.

**Broyttur prísbygnaður – javnseting av ferðaseðlakostnaðinum**
Arbeitt verður við at endurskoða prísskipanina hjá Strandferðsluni fyri at javnseta fólk í ymsu pørtunum í landinum. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst.

**Skaðanevnd**
Landsstýrið hevur raðfest, at skaðanevnd verður sett á stovn. Endamálið við eini skaðanevnd er at kanna og varpa ljós á møguligar orsøkir til, hví ferðsluvanlukkur henda, og á henda hátt vera við til at fyribyrgja aðrar ferðsluvanlukkur.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

### <u>Vinnumál</u>

**Nettrygd**
Talgildar skipanir, ið virka sum grundleggjandi undirstøðukervi í dagsins samfelagi, eru áhaldandi í vanda fyri at verða álopnar. Avleiðingarnar kunnu vera álvarsamar, um skipanir ikki virka, um dátur brádliga ikki eru atkomuligar ella koma í skeivar hendur. Tí mugu vit miðvíst byrgja fyri álopum og

skipa munadygga tilbúgving, ið kann økja um mótstøðuførið og minka um avleiðingarnar, tá ið álop henda.

Farið er tí undir at fyrireika uppskot til løgtingslóg um nettrygd.

Nettrygdarlógin skal lógarfesta krøv, sum samsvara við nýggjastu felags evropeisku nettrygdarfyriskipanir, so at støðið í Føroyum er tað sama sum í øðrum evropeiskum londum, og so at tað ber til at samstarva við onnur lond um nettrygd. Nettrygdarlógin skal serstakliga áseta:

- At almennar dátur skulu flytast um ein tryggan kt-pall (Heldina),
- At serstøk kt-grannskoðan skal gerast fyri avgerandi kt-undirstøðukervi;
- Lógarkrav um nettrygdartilbúgving,
- At tað skal bera til at seta fyritøkum og kommunalum skipanum, ið eru partar av týðandi kt-undirstøðukervinum, kt-trygdarkrøv, og
- Møguligar heimildir at yvirvaka týðandi kt-undirstøðukervi.

**Hvítvask og útflutningseftirlit**

Í vár vórðu ríkislógartilmæli og løgtingslóg um hvítvask samtykt í Løgtinginum. Í báðum førum er talan um at herða og nágreina ta lóggávuna, sum longu var galdandi á økinum. Eisini varð játtanin til eftirlit við hvítvaski, sum Skráseting Føroya stendur fyri, økt í fíggjarlógini, sum varð samtykt í vár. Roknast kann við, at uppgávan við eftirliti við hvítvaski fer at gerast uppaftur størri komandi árini, m.a. tí altjóða eftirlitsstovnar fylgja væl við, um Føroyar liva upp til ta ábyrgd, sum væntað verður, at lond taka á seg fyri at fyribyrgja, at peningur, vunnin av órøttum umvegis flytingar millum lond, verður viðfarin sum lógligur.

Komandi tíðina má roknast við, at meiri orka skal brúkast til at gera reglur um og hava eftirlit við útflutningi, sum annaðhvørt er bannaður sambært tiltøkum, sum eru sett í verk orsakað av kríggnum millum Russland og Ukraina, sí brotið um avmarkandi tiltøk niðanfyri, ella sambært tiltøkum, sum ST Trygdarráðið hevur samtykt at seta í verk. Landsstýrið fer at raðfesta eftirlit við hvítvaski og eftirlit við útflutningi komandi tíðina og væntar at játta meiri pening til hesa uppgávuna hjá Vinnustovninum/ Skráseting Føroya.

**Export Faroe Islands**

Í vinnuni hevur leingi verið ynski um eitt alment samskipandi lið fyri útflutning. Eina eind við orku til at knýta sterkari bond millum útflutningsvinnur og føroysku sendistovurnar, og eina eind, ið kann stuðla undir føroyskan útflutningsframa. Hetta var m.a. lýst í niðurstøðunum frá Vakstrarforumi, sum undanfarna samgonga setti í verk.

Arbeiðið at fyrireika útflutningseindina, Export Faroe Islands (EFI), er byrjað. Fyribils er EFI eitt samstarv millum vinnudeildina og uttanríkistænastuna, og EFI var saman við øðrum vinnuframaskipanum við til at skipa fyri fyrstu altjóða kt- og listaráðstevnuni í Føroyum, TONIK. Tiltakið, sum var sera væleydnað, verður aftur í mai næsta ár.

**Filmsframleiðsla**
Lógin um afturbering til filmsframleiðslu varð í vár broytt, so at filmsframleiðslur, ið brúka upp til 20 mió. kr. í Føroyum, og sum lúka treytirnar fyri afturbering, verða tryggjaðar afturbering upp á 25 prosent av hesum útreiðslunum. Afturbering til verkætlanir, sum kosta omanfyri 20 mió. at fremja, krevur serstaka játtan á fíggjarlógini. Broytingin setir Føroyar meira ájavnt við næstu kappingarneytar okkara og ger tað tí munandi lættari at brúka afturberingarskipanina til at fáa altjóða filmsframleiðarar at framleiða í Føroyum.

**Tónleikaútflutningur**
Tónleikaútflutningsstovan, FMX, sum byrjaði sera varisliga, hevur nú fingið fremri raðfesting. FMX hevur longu verið ein stór hjálp hjá teimum, ið selja tónleik út um landoddarnar. FMX samstarvar eisini við landsmyndugleikarnar, so at samanhangur fæst millum almenn átøk uttanlands, sum nýta tónleik sum part av umboðanini, og arbeiðið hjá FMX at útflyta føroyskan tónleik.

**Landbúnaðarpolitikkur**
Landsstýrið ætlar at fremja eitt tyssi av átøkum, landbúnaðinum at frama. Málið er at framleiða fleiri landbúnaðarvørur og fáa til høldar og gagnnýta alt tað, sum vit kunnu.

Málini eru fleiri og fjøltáttað; úr rúgvuni kunnu nevnast: størri lønsemi í vinnuni, størri mótstøðuføri, ein burðardyggari tilgongd, tá ið um lendisbrúk ræður. Málið verður rokkið við greiðum landbúnaðarpolitikki við denti á størri og burðardyggari framleiðslu og avleiddum broytingum í landbúnaðarlóggávuni.

**Burðardygg ferðavinna og gongd í haga**
Fremsta ferðavinnumálið er burðardygg ferðavinna. Vit skulu skipa ferðsluna í náttúruni og ferðsluna til bygdir væl og miðvíst fara eftir teimum ferðafólkunum, sum virða og hava fyrilit fyri umhvørvi, náttúru og fólkinum, ið her býr. Vit skulu finna loysnir, so vit fara enn betur um náttúruna, samstundis, sum vit skapa trivnað og inntøkur um alt landið. Ein ferðavinna í javnvág við onnur fyrilit, bæði atgongd at náttúruni, vinnulig fyrilit o.a., kann røkkast, um fólkið á staðnum, kommunan og landið arbeiða saman.

Landsstýrismaðurin, sum varðar av bæði ferðavinnu- og landbúnaðarmálum, fer í næstum at tosa við umboð fyri ferðavinnuna, landbúnaðin, áhugafeløg og kommunur. Síðan verður lógaruppskot, sum skal skipa gongd í haga og ferðavinnu, tikið upp við flokkarnar á tingi. Ætlanin er at leggja fram lógaruppskot um hesi viðurskiftini í vetur.

**Matmenning og matpolitikkur**
Vit skulu gerast meira sjálvbjargin við matvørum, og minni bundin at innfluttum landbúnaðarvørum. Landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eru tí báðir farnir undir átøk, ið skulu fremja matvørumenning og gera, at føroyskar matvørur verða betur atkomiligar. Ein týðandi liður í arbeiðinum er at stimbra eftirspurningin og við tí skapa betri grundarlag undir framleiðsluni av føroyskum matvørum.

Í hesum døgum verður lýst eftir umsóknum um stuðul til at fremja royndarverkætlanir, ið kunnu økja framleiðsluna, nýtsluna, virðingina og tilvitskuna um stuttfluttar føroyskar dygdargóðar og heilsugóðar matvørur. Verkætlanirnar skulu hava til endamáls at upplýsa um og gera heilsugóðan mat úr føroyskum rávørum og føroyskari framleiðslu í gerandisdegnum og í undirvísing. Eitt nú kunnu dagstovnar, skúlar, bústovnar og ellis- og røktarheim søkja saman við lokalum framleiðarum, áhugabólkum og fakfólkum.

Um almennir køkar og kantinur raðfesta stuttfluttar rávørur, verður grundarlagið hjá útróðrarmonnum, bóndum og øðrum framleiðarum nógv størri, so tað ber til at gera eitt bæði størri og meiri fjøltáttað útboð av m.a. grønmeti, fiskavørum og mjólkarvørum.

**Aling**
Tað hevur í nógv ár verið arbeitt við at tryggja laksaalingini góðar og tryggar karmar. Tryggu karmarnir og miðsavnaðu loyvini síggjast aftur í góðu úrslitunum, sum tær tríggjar alifyritøkurnar hava havt seinnu árini. Tískil varð eisini mett, at alifyritøkurnar tola at rinda hægri loyvisgjald.

Ein partur av loyvisgjaldinum skal nýtast til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum. Tað kann t.d. vera ávirkan frá aling á havumhvørvi, avbjóðingar við laksalús, aling til havs ella samspælið millum upsastovnin og aling. Endamálið er, at miðvís gransking skal stuðla undir, at føroysk aling eisini frameftir verður burðardygg og virkar í samljóði við okkara umhvørvi, sum er so týðandi partur undir føroyska alivirkseminum. Landsstýrið fer framhaldandi at leggja dent á, at karmarnir kring alingina, bæði laksa- og taraaling, verða mentir. Arbeitt verður í løtuni við ymiskum broytingum í rakstrarkunngerðini.

**Grundvatn**
Við løgtingslógini um grundvatn, sum varð samtykt í vár, eru settar greiðar reglur um vinnuliga at gagnnýta grundvatn, samstundis sum fyrilit verður havt fyri umhvørvi o.ø. Fyrivarnisreglan, sum løgtingslógin ásetur, skal tryggja, at vantandi vitan um grundvatn, vatngoymslur o.a. ikki hevur við sær, at grundvatnið verður dálkað ella oyðilagt.

**Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla og eftirlit við loftrúminum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at taka yvir málsøkið flogferðslu frá 1. januar 2026. Farið verður í næstum undir samskifti við danska samferðslumálaráðharran, so at yvirtøkan kann fremjast sum ein skipað tilgongd, har føroyskir myndugleikar í fyrstu atløgu leggja dent á partin um eftirlit við loftrúminum og møguleikan fyri samvinnu millum eftirlitsradaran, ið eftir ætlan verður settur upp á Sornfelli, og sivilt eftirlit og tænastur til flogferðslu í okkara loftrúmi.

<u>**Uttanríkismál**</u>

**Trygdar- og verjumál**
Síðan Russland framdi ólógligu innrásina í Ukraina í februar 2022, gongur enn einaferð sjón fyri søgn, at trygd, tryggleiki ella friður ikki eru sjálvsøgd í heimspolitikki. Heldur ikki í Evropa. Atgerðir Russlands móti Ukraina og kríggið, tær hava elvt til, skilmarka eitt trygdarpolitiskt vegamót.

Trygd og verja standa aftur ovarlaga á breddanum. Í hesum høpi hevur samanhald millum sameind avgerandi týdning. Saman við flest øllum londum í Evropa og eini røð av samsintum londum hava Føroyar sett avmarkandi tiltøk í verk til tess at leggja trýst á Russland at steðga krígnum og taka seg aftur úr Ukraina.

Harumframt hava Føroyar latið dyrnar upp fyri fólkum, ið eru rýmd undan krígnum, og landsstýrið hevur latið lutfalsliga stórar upphæddir í neyðhjálp.

Atgerðir Russlands móti Ukraina hava ikki havt beinleiðis ávirkan á trygdarpolitisku støðuna um okkara leiðir. Men til tess at ræða Russland frá at halda fram við líknandi atgerðum ímóti øðrum londum og serliga londunum í NATO, verða nýggj verjupolitisk átøk sett í verk um alt Evropa, og lond raðfesta trygdar- og verjupolitisk átøk, eisini í Norðuratlantshavi og í Arktis. Landsstýrið hevur gjørt yvirskipaða semju við donsku stjórnina um verjumál í sambandi við eina 10 ára raðfestingarætlan at styrkja donsku verjuna.

Føroyar virka fyri, at friður og støðufesti valda. Tað er ein raðfesting fyri landsstýrið at taka virknan lut í samstarvinum um trygdar- og verjumál um okkara leiðir. Millum annað hava flotavenjingar verið við Føroyar, har eisini Brimil hevur tikið lut, umframt at alsamt fleiri herskipavitjanir eru í Føroyum. Landsstýrið skal vera við í øllum avgerðum, tilgongdum og ætlanum, sum hava týdning fyri trygd og verju í Norðuratlantshavi og í Arktis.

Samstarvið við donsku verjumyndugleikarnar er økt seinnu árini, og samskiftið við NATO, USA og grannalondini Bretland, Noreg og Ísland um verjupolitisk viðurskifti er eisini í støðugari menning.

**Avmarkandi tiltøk**

Síðan Russland í fjør gjørdi innrás í Ukraina, hava londini í ES, NATO og onnur samsint sett í verk víðfevnd avmarkandi tiltøk ímóti Russlandi til tess at leggja trýst á Russland at enda kríggið. Tiltøkini verða regluliga dagførd við tí fyri eyga áhaldandi at økja um trýstið á Russland.

Við løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, við seinni broyting, er í stóran mun heimild fyri at seta tey tiltøk í verk, sum ES hevur samtykt móti Russlandi og Hvítarusslandi. Landsstýrið væntar framhaldandi at leggja seg uppat ES tiltøkunum í tann mun, tað er viðkomandi fyri Føroyar.

Landsstýrið víðkaði avmarkandi tiltøkini soleiðis at atgongdin hjá russiskum fiskiskipum til føroyskar havnir er skerd frá 12. juli at rokna. Einans fiskiskip, sum veiða sambært fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Russland, kunnu koma í føroyska havn at skipa um og upp. Hesi skipini kunnu eisini fáa veitingar sum proviant og olju, men aðrar tænastuveitingar eru skerdar.

**Samstarv við ES**
Landsstýrið vil menna eitt sterkari og meira fjøltáttað samstarv við ES. Ítøkiliga verður arbeitt við nýggjum samstarvskarmi millum partarnar, ið skal tryggja tættari og meira skipað samstarv, bøta um verandi samstarv og geva møguleikar at menna nýggj samstørv. Hóast talan í fyrstu atløgu er um eina óbindandi yvirlýsing, verður mett, at hetta er eitt týðandi stig á leiðini móti styrktum samstarvi.

Sum liður í at menna viðurskiftini og økja vitanina um Føroyar í ES-skipanini, er ein nationalur serfrøðingur settur í uttanríkistænastuni hjá ES, sum serliga skal arbeiða við viðurskiftunum millum Føroyar og ES.

Í fjør undirritaðu Føroyar og ES sáttmála um luttøku Føroya í samstarvsætlanum hjá ES, sum m.a. tryggjar, at føroyski atlimaskapurin í samstarvsætlanini fyri gransking og menning hjá ES, Horizon Europe, heldur fram. Sáttmálin gevur somuleiðis Føroyum møguleika at gerast partur av teimum samstarvsætlanum hjá ES, ið loyva atlimaskapi fyri lond uttanfyri ES.

**Samstarv við USA**
Seinnu árini hevur samstarvið við USA verið í stórari menning. Í 2020 undirritaðu Føroyar og USA eina partalagsyvirlýsing um at økja samstarvið. Umframt at USA er ein týðandi útflutningsmarknaður fyri føroyskar fiskavørur, hevur partalagsyvirlýsingin latið upp fyri víðkaðum politiskum, vinnuligum og mentanarligum samstarvi umframt innan fyri útbúgving og gransking.

Millum málini, sum Føroyar raðfesta, er at lata upp sendistovu í Washington, eftir ætlan í fyrru helvt av 2024. Harumframt er ætlanin saman við føroyskum mentanar- og vinnulívi at skipa fyri einum mentanarátaki í New York í apríl 2024.

Alsamt fleiri amerikansk flotafør hava seinnu árini vitjað í Føroyum. Talan er um eina gongd, sum er avtalað millum partarnar, og sum er við til at stuðla undir góðu viðurskiftini millum Føroyar og USA.

Í partalagsyvirlýsingini er ásett, at ein árligur fundur skal vera millum Føroyar og USA fyri at fremja endamálið um tættari samstarv í verki. Fyrsti partalagsfundur varð hildin í Washington DC í februar 2023. Næsti fundur verður í Føroyum tíðliga í 2024.

**Handil við umheimin**
Landsstýrið arbeiðir áhaldandi fyri at tryggja føroyskum vørum kappingarføra marknaðaratgongd til viðkomandi marknaðir úti í heimi. Her hevur arbeiðið mótvegis ES, Bretlandi, Kina, Japan og Suðurkorea serliga høga raðfesting.

**Arktiskur politikkur**
Arktis broytist. Politiski og búskaparligi týdningurin, ið Arktis hevur í millumtjóða høpi, verður alsamt størri. Av tí sama verður arktiska økið og fólkini, ið her búgva, í størri mun enn fyrr ávirkað av altjóða rákum. Tær broytingar, sum henda í arktiska økinum, raka eisini Føroyar. Tí læt landsstýrið í fjør gera

ein arktiskan politikk, sum setir út í kortið, hvat føroyski leikluturin í Arktis skal vera, bæði í nærmastu framtíð og sum frá líður.

Politikkurin hevur til endamáls at skilmarka Føroyar sum millumtjóða samstarvspart í Arktis, styrkja leiklut Føroya í Arktiska ráðnum og fáa til vega grundarlag fyri avgerðum, sum skapa menning, vitan og framburð í Føroyum og restini av Arktis.

Arktiski politikkurin fevnir um átta strategisk høvuðsevni og fleiri ítøkiligar málsetningar. Bulurin í arktiska politikkinum eru tey átta høvuðsmálini: Trygd og støðufesti; Millumtjóða samstarv; Umhvørvi, náttúra og veðurlag; Gransking, vitanarmenning og útbúgving; Tilbúgving; Tilfeingi í havinum; Vinnumøguleikar og burðardygg menning umframt Mentan og samfelag

Politikkurin verður í løtuni dagførdur og verður í heyst borin Løgtinginum sum frágreiðing til aðalorðaskiftis.

**Sendistovur**
Føroyar hava í dag sjey sendistovur. Tær eru í Keypmannahavn, Brússel, London, Reykjavík, Moskva, Beijing og Tel-Aviv. Sendistovurnar eru bygnaðarliga partur av uttanríkistænastuni.

Fyri at styrkja um vaksandi samstarvið við USA er ætlanin at lata upp sendistovu í Washington í komandi ári.

Virksemið á sendistovuni í Moskva er minkað nógv síðan ólógligu russisku innrásina í Ukraina. Gjørt er tí av at røkja sendistovuna úr Føroyum fyribils. Hetta merkir, at eingin føroyskur sendimaður verður á sendistovuni í Moskva, so leingi sum umstøðurnar eru óbroyttar.

## HEILSUMÁL

**Heilsupolitikkur**
Í Føroyum hava vit eitt gott og framkomið heilsuverk, sum veitir vælferðartænastur til okkara borgarar. Vælferðartænastur, sum eru grundleggjandi fyri trivnað og menning í samfelagnum. At vælferðartænasturnar skulu tryggjast, er millum høvuðsmálini hjá samgonguni.

Heilsupolitisku ætlanirnar hjá landsstýrinum eru nógvar. Heilsuøkið er í støðugari menning, og tað er týdningarmikið, at heilsutænastur og heilsuskipanir eru tíðarhóskandi og framhaldandi verða mentar og dagførdar.

Farið er undir arbeiðið at nýhugsa heilsutilboð í nærumhvørvinum hjá borgarunum. Trýstið á heilsuverkið er stórt og veksur støðugt. Seinnu árini hevur verið arbeitt stigvíst og miðvíst við at menna Sjúkrahúsverkið og Apoteksverkið. Tørvur er á at fara undir at umskipa tann partin av heilsuverkinum,

sum liggur uttanfyri Sjúkrahúsverkið. Umskipanin er ein fortreyt fyri ávikavist at kunna veita borgarum kring landið betri og fleiri tilboð um heilsutænastur í nærumhvørvinum, fyri at hetta økið kann mennast, og fyri at tálma trýstið á Sjúkrahúsverkið.

Eins og í okkara grannalondum eru avbjóðingar við alsamt vaksandi tørvi á heilsutænastum og heilsustarvsfólki. Tí er eisini týdningarmikið, at arbeitt verður við at gera yvirskipaðar ætlanir fyri heilsuøkið.

**Heilsupolitikkur og fólkaheilsuætlan**

Farið er undir fyrireikingar at orða uppskot til ein heilsupolitikk fyri Føroyar. Langtíðarætlanir skulu leggjast fyri heilsuøkið við ítøkiligum málum og visjónum.

Sum partur av átøkunum í heilsupolitikkinum fyri Føroyar er ein fólkaheilsuætlan. Í samstarvi við viðkomandi partar, harundir Fólkaheilsustýrið, skal nýggj fólkaheilsuætlan gerast fyri tíðarskeiðið 2024-2030.

**Dimensioneringsætlan/serlæknaplanlegging**

Arbeitt verður við at orða eina dimensioneringsætlan/serlæknaplanlegging, har avgerð skal takast um, hvørji serlæknaøki skulu mennast í heilsuverkinum. Greið mál skulu setast fyri, hvussu tørvurin á serlæknum í Sjúkrahúsverkinum og kommunulæknaskipanini verður nøktaður komandi árini.

**Skipa universitetssjúkrahús**

Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Sjúkrahúsverkinum, Fróðskaparsetrinum og Heilsumálaráðnum arbeiðir í løtuni við einum tilmæli til landsstýriskvinnuna um, hvussu Sjúkrahúsverkið kann fyrireikast til at gerast universitetssjúkrahús. Arbeiðsbólkurin skal lýsa, hvat liggur í hugtakinum "universitetssjúkrahús", og hvat krevst til at fyrireika Sjúkrahúsverkið til at gerast universitetssjúkrahús. Harumframt skal arbeiðsbólkurin lýsa onnur viðurskifti, ið hava týdning, t.d. í hvønn mun simultatiónshøli (royndarhøli) skulu innganga í hesum samanhangi. Tilmæli verður væntandi handað landsstýriskvinnuni 1. september 2023.

**Kommunulæknaskipanin dagførast**

Kommunulæknaskipanin verður endurskoðað. Farið er undir arbeiðið at nýhugsa verandi skipan og menna tilboð um heilsutænastur til borgarar kring landið. Ætlanin er, at tær kanningar, viðgerðir o.s.fr., sum kunnu fara fram uttanfyri Sjúkrahúsverkið, skulu fara fram í nærumhvørvinum hjá borgarunum. Fyri at røkka hesum verður landið skipað í heilsuøki við einum ella fleiri heilsumiðstøðum. Dentur fer at verða lagdur á at góðskumenna heilsutænasturnar og tryggja sama góðskustøði kring landið.

**Fakligur stjóri fyri kommunulæknaskipanina**

Ætlanin er at seta ein fakligan stjóra fyri kommunulæknaskipanina undir Heilsutrygd. Fakligi stjórin skal hava læknafakligu ábyrgdina í Heilsutrygd. Viðkomandi skal m.a. tryggja, at fakliga dygdin í kommunulæknaskipanini støðugt verður ment og skal tryggja sama høga góðskustøði kring landið. Harafturat skal fakligi stjórin hava ábyrgdina av Læknavaktini og starvsfólkunum, sum starvast í hesi skipan.

**Økja talið á kommunulæknaviðtalum**
Í næstum verður talið á kommunulæknaviðtalum økt. Sett verða trý nýggj kommunulæknastørv. Við hesum fara viðtalurnar úr 34 upp í 37. Nýggju størvini verða sett í Norðoya læknadømi, Fuglafjarðar læknadømi og Suðurstreymoyar læknadømi. Hetta verður til fyrimuns fyri bæði fólk og kommunulæknar. Fólk í hesum økjum fáa munandi betri atgongd til kommunulækna, og kommunulæknarnir fáa betri arbeiðsumstøður.

**H-bygningurin skal gerast liðugur og takast í nýtslu**
Talan er um mest hátekniska almenna bygning, sum er bygdur í Føroyum. H-bygningurin er um 15.000 fermetrar til støddar, fevnir millum annað um nýggjar medisinskar seingjardeildir, føði- og barnsburðardeild við tveimum neonatal serstovum, psykiatriskan depil, hølir til sjúkrahúsuppvenjing, sjúkrahúskøk og felags kantinu. Nøkur bygningsarbeiði eru eftir, sum verða sett í nýggja verklagslóg at leggja fyri Løgtingið.

**Dialysuviðgerð í Suðuroy**
Fyrireikingarnar at fara undir dialysuviðgerð í Suðuroy eru komnar so væl áleiðis, at tænastan verður sett í verk í heyst. Fyri borgarar í Suðuroynni, ið hava tørv á dialysuviðgerð, merkir tað, at tey sleppa undan at ferðast til Havnar fleiri ferðir um vikuna. Hetta merkir eisini, at møguligt verður at skipa fyri gestadialysu í Suðuroynni soleiðis, at aðrir dialysusjúklingar kunnu fara til Suðuroyar, og eftir avtalu við dialysueindina fáa dialysuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi.

**Bráðfeingis sálarlig hjálp**
Læknavaktin (1870) verður styrkt við førleikum og tilfeingi frá Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Nakað av víðkaða virkseminum verður telefonisk ráðgeving, og arbeitt verður við at styrkja førleikarnar á hesum økinum. Læknavaktin verður væntandi klár at veita bráðfeingis sálarliga hjálp til heystar. Hendan broytingin er samsvarandi yvirskipaðu politisku ætlanunum um, at sálarligar og kropsligar sjúkur verða javnsettar í heilsuverkinum.

**Verkseta tilmælir úr Krabbameinsætlanini**
Krabbameinsráðið, sum hevur til endamáls at ráðgeva um, hvussu tilmælini í krabbameinsætlanini frá 2022 skulu raðfestast, hevur latið landsstýriskvinnuni fyrsta tilmælið. Landsstýriskvinnan hevur tikið undir við tilmælinum um at raðfesta fýra átøk úr krabbameinsætlanini:

- Serlækni við palliatión skal setast í Sjúkrahúsverkinum skjótast gjørligt.
- Sjúkrahúsverkið skal saman við kommunulæknaskipanini gera tilmæli um nýggja ávísingar- og útgreiningarskipan.
- Tilmæli við tíðar- og kostnaðarætlan skal gerast um, hvussu screening fyri tarmkrabba skal skipast í Føroyum.
- Nýggj fólkaheilsuætlan skal orðast.

**Roykilógin skal dagførast**
Roknað verður við, at árliga doyggja umleið 130 føroyingar av sjúkum, sum standast av royking. Tær sjúkur og tey andlát, sum standast av sjúkum, sum hava samband við royking, kundu verið fyribyrgd, um fólk ikki royktu. Fleiri tilmæli í Krabbameinsætlanini snúgva seg um tiltøk at minka um royking og skaðiligu avleiðingarnar av royking. Tætt samband er millum royking og eina røð av sjúkum, og tí eru tey, sum roykja, í øktum vanda fyri at fáa ymsar sjúkur, harav fleiri av teimum eru deyðiligar, t.d. krabbamein. Sambært heimsheilsustovninum WHO er royking ein meginorsøk til krabbamein. Børn og persónar við varandi sjúkum eru serliga viðbrekin, tá ið tað snýr seg um royking og passiva royking.

Aðalmálið í komandi roykilógini er at veita øllum lógartryggjað rættindi til at kunna liva og virka í einum umhvørvi, sum ikki er heilsuskaðiligt. Dentur fer serliga at verða lagdur á at verja børnini og tey ungu.

**Yvirtøka av farsóttarmálsøkinum**
Í vár samtykti Løgtingið at yvirtaka farsóttarmálsøkið. Næsta stig er at tryggja íverksetanina av farsóttarmálsøkinum, so at økið kann virka til fulnar á føroyskum hondum, tá ið tað verður yvirtikið tann 1. januar 2024. Ætlanin er, at Fólkaheilsustýrið skal umsita farsóttarmálsøkið. Í hesum sambandi verður m.a. arbeitt við at gera eina samstarvsavtalu millum føroyskar og danskar myndugleikar á farsóttarmálsøkinum.

**Fyrireika yvirtøku av landslæknaembætinum**
Tá ið farsóttarmálsøkið er yvirtikið tann 1. januar 2024, verður farið undir at fyrireika yvirtøkuna av Landslæknaembætinum.

**Uppskot til nýggja ílegulóg**
Uppskot til nýggja ílegulóg verður lagt fyri løgtingið í hesi tingsetuni. Lógin skal eins og galdandi lóg serliga tryggja rættindini hjá teimum, hvørs ílegur verða nýttar í gransking í mannaílegum. Millum annað ásetir lógin, at Fólkaheilsustýrið hevur einkarætt at savna, handfara og goyma vevnað og diagnosur til gransking í mannaílegum. Lógin regulerar skráirnar, sum fyrrverandi Ílegusavnið – nú Fólkaheilsustýrið – umsitur. Tær eru: vevnaðarskráin, diagnosuskráin og ættarbandsskráin. Sum nýggja áseting regulerar lógin eisini genomskránna, ið verður nýggj skrá við upplýsingum ætlaðar til persónlagað medisin.

Ein broyting frá galdandi lóg er, at nýggja lógin fevnir breiðari. Galdandi lóg er bara galdandi fyri gransking, har ættarbandsupplýsingar eisini eru partur av granskingini, men nýggja lógin regulerar alla gransking í mannaílegum.

# ALMANNA- OG MENTAMÁL

## Almannamál

### Almannapensjónir

Skipanin við um- og eftirrokning av pensjónum er stirvin, umsitingarliga tung og kann seta pensjónistar í trupla fíggjarliga støðu. Tøkniliga menningin í Almannaverkinum hevur við sær, at tað er møguligt at broyta skipanina, men neyðugt er við lógarbroyting. Landsstýrið ætlar tí at broyta løgtingslóg um almannapensjónir soleiðis, at pensjónin hvønn mánað verður ásett við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Við broytingini verður pensjónin javnað so hvørt, tá ið inntøkuviðurskiftini hjá pensjónistunum broytast, og samstundis slepst undan trupulleikanum við stórum eftirrokningum til pensjónistar.

Ætlanin er eisini at endurskoða, hvussu mótrokningin av arbeiðsinntøku av fólkapensjónini kann tillagast soleiðis, at lágløntu pensjónistarnir ikki verða mótroknaðar ov skjótt.

Harumframt er neyðugt at tillaga almannapensjónslógina soleiðis, at hon verður í samsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd. Tørvur er á at fáa greiðari reglur um rættin til at innvinna almannapensjón hjá teimum, sum umframt í Føroyum hava búð og arbeitt í øðrum londum.

Sambært galdandi lóg hava pensjónistar, sum hava nettoinntøkur hægri enn 2.000 kr., ið verða verða skattaðar sbrt. kapitalvinningsskattalógini, ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Ætlanin er at broyta markið, tí ásetingin kann raka pensjónistar við heilt lítlari ogn.

### Dagpengaskipanin

Treytirnar hjá smærri privatum arbeiðsgevarum, ið hava starvsmenn í starvi, verða bøttar. Landsstýrið ætlar at arbeiðsgevarin í ávísan mun skal fáa endurgjald fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, ið verða sjúkir.

### Brekumboð

Uppskot til løgtingslóg um Brekumboð hevur verið til ummælis, og lógaruppskotið verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í næstum. Endamálið við lógaruppskotinum er at bøta um rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek. Brekumboðið skal virka fyri, verja og hava eftirlit við, at innlendis lóggáva, tænastur og tilboð eru í samsvari við Breksáttmálan. Eisini skal Brekumboðið hava ein upplýsandi leiklut um rættindi hjá fólki, ið bera brek. Eftir ætlan kann Brekumboðið fara til verka 1. januar 2024.

### Tann góða tilgongdin

Í samgonguskjalinum er ásett, at "Tann góða tilgongdin" skal eftirmetast og víðkast. Arbeiðið við at eftirmeta ta góðu tilgongdina er í gongd. Eftirmetingin verður gjørd saman við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Kommunufelagnum og Autismufelagnum. Eftir ætlan skal arbeiðið vera liðugt í heyst. Borgarar, sum bera brek, hava ofta tørv á tænastum frá nógvum ymiskum stovnum

og myndugleikum. ”Tann góða tilgongdin” er ein skipaður tvørgeiraligur og tvørfakligur samstarvsleistur, sum hevur til endamáls at samskipa tænastur frá ymiskum myndugleikum saman við familjum, sum hava barn við autismu, so at gerandisdagurin hjá familjunum verður lættari.

**Bygging av vardum bústøðum**
Ætlanin er at gera breiða semju millum allar flokkar á tingi um eina langtíðarætlan um at byggja vardar bústaðir og verkstaðir komandi 10 árini. Ætlanin er at byggja umleið 10-12 nýggjar stovnar. Bygningarnir skulu koma í staðin fyri núverandi stovnar, ið eru smáir, ótíðarhóskandi og í vánaligum standi, umframt at útvega fleiri bupláss, umlættingarpláss og frítíðartilboð. Í løtuni verður arbeitt við at fyrireika tvær byggiverkætlanir, onnur í Tórshavnar kommunu til 24 fólk við autismu og hin í Vága kommunu, ið verður til 18 fólk. Hesir stovnar koma í staðin fyri verandi smærri bústovnar, umframt at nøkur fleiri bupláss verða á nýggju stovnunum.

Byggiverkætlanirnar Sambýlið á Mýrini í Hoyvík og Heimið til børn og ung við autismu í Kvíggjartúni á Argjum eru um at vera lidnar, og væntandi flyta fólk inn eftir summarfrítíðina. Byggingin av Sambýlinum í Reynstúni á Argjum gongur væl, bygningurin verður væntandi liðugur fyrst í 2024, og búfólkini fara at flyta inn áðrenn summarfrítíðina 2024.

Løgtingslógin um dagføring av vardum bústøðum frá 2020 hevur gildið til ársskiftið 2023. Fleiri av verandi stovnum eru dagførdir, og 11 nýggj pláss eru útvegað. Eftir at lógin kom í gildi, er frágreiðingin “Í góðum hondum” latin úr hondum. Her verður mælt til at byggja størri bústovnar,  og tí verða nakrir av verandi smærri, óhóskandi bústovnum ikki dagførdir, men heldur niðurlagdir, so hvørt nýggir stovnar verða bygdir.

**Samskiftismenning**
Í samgonguskjalinum er ásett, at “Fólk, ið hava skerdar samskiftisførleikar, skulu hava tilboð um hjálp”. Í dag verður samskiftismenning einans veitt í minni mun, og fleiri málbólkar fáa lítla ella onga tænastu. Fyri fíggjarárið 2023 er játtanin til endur- og viðlíkahaldsvenjing hækkað1 mió. kr. Almannaverkið er farið undir at skipa tænastuna soleiðis, at tað í størri mun verður møguligt at veita hesum málbólki samskiftismenning, harundir taluvenjing.

**Heimleys**
Almanna- og mentamálaráðið er farið undir at at kortleggja økið og avbjóðingar, til tess at fáa betri innlit. Ætlanin er at gera uppskot til, hvørji munagóð átøk kunnu gerast fyri at hjálpa heimleysum og teimum, sum arbeiða á økinum, og “Heildarætlanin fyri at basa rúsevni í Føroyum” er tikin við í hetta arbeiði. Neyðugt er at arbeiða á fleiri mótum, og neyðugt er, at fleiri partar lyfta í felag. Almanna- og mentamálaráðið er í løtuni í samskifti við avvarðandi partar um at gera nøkur felags átøk fyri at bøta um korini hjá teimum heimleysu, sum halda til í miðbýnum í Havn.

**Eftirmeting av heimatænastu og eldrarøkt**

Landsstýriskvinnan í almannamálum fer í næstum at tosa við kommunurnar um tilmælini í eftirmetingini av eldraøkinum frá 2021. Tað, sum semja er um, verður sett í verk. Eitt av tilmælunum í eftirmetingini var, at gjøldini á eldraøkinum áttu at tillagast, og er hetta longu framt. Kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. er broytt soleiðis, at nú kunnu kommunurnar áseta hægst møguliga gjald fyri vistarhald og tænastur á eldrabústaði og fyri heimahjálp.

**Javnstøða**

Klaguvegleiðing er nú gjørd til javnstøðulógina. Tað er gott, men tørvur er á at endurskoða alla lógina, sum verður 30 ár næsta ár. Sum liður í hesum arbeiði er kanning gjørd um javnstøðu í Føroyum saman við Fróðskaparsetri Føroya. Harumframt er sjøtul settur á arbeiðið at savna saman hagtøl um javnstøðu á einum og sama stað. Hesi bæði eru fortreyt fyri, at arbeiðið við dagførdu lógini verður grundað og kjølfest í tí broytiliga umhvørvi, sum javnstøðumál eru partur av. Í næstum verður farið undir at gera eina javnstøðupolitiska virkisætlan, ið skal taka atlit at ta samtíð, vit liva í, og vísa á, hvar og hvussu vit kunnu arbeiða miðvíst við at fremja javnstøðu fyri allar føroyingar.

**Arbeiðið at basa harðskapi í parlagi og nærsambondum heldur fram**

Nýggj heildarætlanin um harðskap í parlagi og nærsambondum við nýggjum átøkum er handað landsstýrinum. Nýggja heildarverkætlanin byggir víðari bæði á arbeiðið úr fyrru verkætlanunum og royndunum frá arbeiðinum við at basa harðskapi í Føroyum og uttan úr heimi. Talan verður um áleið 20 átøk, sum verða skipað í tøttum samstarvi við harðskapsfakliga økið og eru ætlað at menna og styrkja tey tilboð, sum í dag verða veitt harðskapsraktum og teirra avvarðandi eins og teimum, ið fremja harðskap. Ætlanin er at leggja frágreiðing um nýggju heildarætlanina fyri Løgtingið til orðaskifti í heyst.

## Mentamál

**Kringvarp Føroya**

Tað hevur alstóran týdning fyri fólkaræðið at hava sterkan Public Service stovn. Tørvur er á at styrkja Kringvarpið m.a. tøkniliga, málsliga og fakliga. Nývalda stýrið fyri Kringvarpi Føroya fer at leggja fram uppskot um nýggjan Public Service sáttmála fyri Almanna- og mentamálaráðið. Áðrenn sáttmálin verður undirskrivaður, skal Løgtingið hava havt høvi at umrøða ætlaða innihaldið í sáttmálanum, soleiðis sum ásett er í kringvarpslógini. Ætlanin er eisini at endurskoða kringvarpslógina, undir hesum at hyggja nærri at kringvarpsgjaldinum og prístalsjavning. Kringvarpið hevur boðað frá, at tey framhaldandi ætla at kanna møguleikarnar fyri føroyskum limaskapi í European Broadcasting Union (EBU).

**Miðlastuðulin**

Privatu miðlarnir skulu styrkjast. Arbeitt verður tí við at endurskoða verandi skipan, har 70% av játtanini skulu latast til verkætlanir og restin til lønir. Vónandi ber til at hækka stuðulin og broyta skipanina so, at hon gerst greiðari at umsita, samstundis sum miðlarnir gerast sterkari. Verandi skipan er ov tung at umsita, og tí er ætlanin at styrkja umsitingina av miðlastuðlinum.

**Tjóðleikhúsið**
Heildarætlan er gjørd fyri økið. Ætlanin er at seta 4.000 fermetrar av til nýggja Tjóðleikhúsið - áleið har Farstøðin á Bursatanga er - og at gera avtalu við kommununa um økið. MAP Arkitektar vunnu arkitektakappingina, ið var í fjør. Næsta stigið er at fyrireika eina verklags- og heimildarlóg, har Løgtingið setir ávísa upphædd av til verklagið og samstundis gevur landsstýriskvinnuni heimild til at taka ímóti fígging frá útlendskum grunnum. Landsverk hevur gjørt tilfar, ið skal brúkast í sambandi við samskifti við útlendskar grunnar.

**Nýggj bókasavnslóg**
Orsakað av stóru broytingunum, sum eru farnar fram í samfelagnum síðani aldarskiftið, verða sett alsamt størri krøv til tænastuveitingarnar á bókasavnsøkinum og ikki minst á útbúgvingarøkinum, á samskiftisøkinum og á tøkniliga økinum. Av tí sama legði landsstýriskvinnan fram uppskot um nýggja bókasavnslóg, ið varð samtykt, áðrenn Løgtingið fór í summarfrí. Í nýggju bókasavnslógini verður sett sum krav, at øll skulu hava atgongd til bókasavnstænastur. Eitt nýbrot er m.a., at nýggja bókasavnslógin gevur øllum borgarum atgongd til føroyskar talgildar bøkur/ljóðbøkur.

**Føroyskar ljóðbøkur**
Nýggja bókasavnslógin hevur við sær, at føroyskar ljóðbøkur, ið Landsbókasavnið hevur framleitt til blind og sjónveik, kunnu verða seldar forløgum at geva út til almenningin. Føroyskar ljóðbøkur verða tí til láns á netinum umvegis bókasøvnini hjá øllum. Við hesum verður tí eisini eitt fet tikið á rættari leið, tá ið tað kemur til rættindi hjá fólki, sum bera brek.

**Fornminnini í Kirkjubø**
Varðveitingararbeiðið á múrverkið í Múrinum og Líkhús er nú gjørt. Múrurin og Líkhús eru væl skrásett, og bygningssteinar og viðarlutir, ið hoyra til fornminnini, eru 3D skrásett og løgd á goymslu. Fyri at gera Múrin betur atkomuligan hjá øllum er ætlanin í ár at leggja flísar úr føroyskum gróti uttanfyri og inni í Múrinum. Eisini er ætlanin at tryggja bakkan undir Líkhúsi og at gera tiltøk, ið fáa partar av toftunum av miðaldar biskupsgarðinum vestanfyri bóndahúsini at trýna týðiligari fram og á tann hátt miðla stórbæra biskupsgarðin betur.

**Ítróttur**
Arbeitt verður framhaldandi við at stuðla ÍSF í strembanini eftir føroyskum limaskapi í altjóða olympisku nevndini, IOC. Somuleiðis vil samgongan stuðla føroyskum limaskapi í millumtjóða ítróttarfelagsskapum og kappingum. Játtanin til ÍSF er hækkað 2 mió. kr. í 2023. Einki er sjálvsagdari enn føroyskur limaskapur í IOC undir føroyskum flaggi, tá ið hugsað verður um øll tey megnaravrik, ið føroyskir einstaklingar og lið hava framt seinastu árini í m.a. hondbólti, svimjing og rógving.

**Listasavnið**
Arbeitt verður við einari loysn at umvæla alt savnið, so at hølisumstøðurnar verða dagførdar og neyðugar ábøtur gjørdar. Í løtuni verður arbeitt við at fáa fígging úr grunnum til endamálið, og tað gongur framá við tí arbeiðinum. Tá ið nøktandi uttanhýsis fígging er fingin til vegar, verður politisk tikin støða til landsins part av fíggingini.

**Fólkakirkjan**
Løgtingið hevur samtykt lóg, ið heimilar landsstýrismanninum at býta upp embætisuppgávur millum próstar til tess at lætta um fyrisitingarligu tilgongdirnar.

Arbeitt verður við nýggjari kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk í føroysku fólkakirkjuni.

Tveir serprestar skulu setast í starv í fólkakirkjuni. Talan er um tvær spennandi nýskipanir við einum diakonpresti og einum studentapresti.

Løgtingið hevur í vár samtykt at leingja mvg-afturberingarskipanina fyri kirkjur og samkomur, so at tey fáa meirvirðisgjaldið endurrindað, tá ið farið verður undir stórar íløgur, og at eingin ivi er um, at vanligur og staðbundin kirkjuskattur eru at meta sum sjálvboðin innsavnan sambært mvg-lógini.

Tvær kirkjubyggingar verða fyrireikaðar í løtuni – á Glyvrum og á Argjum.

**Symfoniorkestrið**
Játtanin til Symfoniorkestrið er hækkað 300.000 kr. til at økja um virksemið hjá orkestrinum. Symfoniorkestrið fylti 40 ár í ár, og tað hevur verið hátíðarhildið við ymiskum konsertum. Orkestrið hevur lagt ætlan fyri framhaldandi menning av orkestri og kóri.

**Filmsstuðulin**
Játtanin til filmsstuðul er hækkað 500.000 kr. til at varðveita menningina á filmsøkinum. Stórir menningarmøguleikar eru í filmsvinnuni, og filmsvinnan ger vart við seg bæði uttanlands og her heima. Filmur er samanrenning av mentan og vinnu, og íløgur í filmin kasta væl av sær aftur til føroyska samfelagið. Eisini verður arbeitt við, at Føroyar gerast partar av ES-stuðulsskipanini, Creative Europe. Fyrsta stóra stigið var at samtykkja UNESCO-2005 sáttmálan, ið varð gjørt fyrr í ár.

**Armslongd**
Samgongan hevur sett sær sum aðalmál, at “listin skal stuðlast, ikki stýrast”. Stuðulsjáttanir verða umsitnar sambært armslongdarmeginregluni. Játtanirnar til ymsu listagreinirnar, t.d. til yrkisleiklist og filmsstuðul verða endurskoðaðar og lagdar í fasta legu. Armslongd, fakligheit og útskifting eru høvuðstættir í einum komandi mentanarpolitikki, ið landsstýrið eisini ætlar at seta út í kortið. Mentanargrunnurin verður brúktur sum fyrimynd.

**Avtøka av biograflógini**
Lógaruppskot verður lagt fram í næstum um at avtaka biograflógina. Lógin er ein leivd frá tíðini við filmseftirliti. Tað er hvørki tíðarhóskandi ella í samsvari við armslongdarmeginregluna, at landsstýrisfólkið ger av, hvør hevur loyvi til at vísa filmar og ikki.

**Listprýðislóggáva**
Arbeitt verður við einum lógaruppskoti, har ávísur partur av byggikostnaðinum hjá landinum skal markast til listprýði av bygningum landsins. Líknandi skipan er í gildi í Íslandi.

**UNESCO-sáttmálin**
Landsstýriskvinnan í mentamálum hevur í samráð við Uttanríkis- og vinnumálaráðið tikið stig til, at Føroyar nú hava tikið undir við UNESCO-sáttmálanum frá 20. okt. 2005. Mentanarpolitisk stevnumið um at verja og fremja margfeldi í mentanarligum úttrykki hava stóran týdning fyri livikor og virksemi hjá yrkislistafólki, leikfólki, starvsfólki á mentanarstovnum og felagsskapum. Undirtøka fyri sáttmálanum er ein fortreyt fyri limaskapi í ES-samstarvsætlanini, Creative Europe 2021-2027, ið veitir stuðul til listaligar og mentanarligar verkætlanir umframt verkætlanir í skapandi vinnum.

**Stuðul til ymiskar verkætlanir**
30 mió. kr. eru settar av til Stórhøllina í Hoyvík, og ein heimildarlóg verður løgd fyri tingið í heyst.

Til Mentanarhúsið í Klaksvík eru 7 mió. kr. játtaðar afturat teimum 5 mió. kr., ið vórðu játtaðar fyri 2022. Harvið er játtanin til Mentanarhúsið í Klaksvík tilsamans 12 mió. kr. aftur ímóti upprunaligu umbønini, ið var 15 mió. kr. Við hesum er landsins partur av stuðlinum tann størsti umframt stuðulin frá Klaksvíkar kommunu.

**Styrkja føroyska málið**
Landsstýrið hevur raðfest føroyska málið, og játtanin fyri 2023 til at arbeiða við Føroysku orðabókini er tí hækkað 400.000 kr. Tað verður Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya, sum eftir nærri avtalu fer at dagføra Føroysku orðabókina.

Somuleiðis er játtanin til Málráðið hækkað 100.000 kr., so at Málráðið m.a. kann fáa nýggja heimasíðu, tá ið Stavsetingarorðabókin væntandi verður liðug í 2023. Harumframt er arbeiðssetningur orðaður, so at arbeiðsbólkur kann fara í holt við at eftirmeta lógina um Málráðið.

Avtalan við Sprotan, sum tryggjar øllum føroyingum atgongd til nógv brúktu orðabøkurnar hjá Sprotanum og Orðabókagrunninum, verður dagførd, og rættindini til orðabøkurnar verða tryggjað soleiðis, at landið fær forkeypsrætt til tilfarið, so tað ikki kann avhendast øðrum enn landinum, um Sprotin/ Orðabókagrunnurin skuldu steðgað virkseminum.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁL

**Dagstovnaøkið**
Ein høvuðsavbjóðing á dagstovnaøkinum er trot á útbúnum námsfrøðingum. Tey komandi árini verður játtan sett av til tveir flokkar um árið, og longu í august í ár verða tveir flokkar av námsfrøðilesandi tiknir inn á Setrinum. Dagstovnaráðið hevur í sínum áliti "Fyri barnsins besta" mælt til, at ein heildarætlan verður gjørd fyri dagstovnaøkið. Saman við kommununum verður farið undir at endurskoða dagstovnalógina og at tryggja besta skifti frá dagstovni til skúla.

**Fólkaskúlin**
Arbeiðsbólkur hevur fyri kortum latið úr hondum álit við tilmælum um broytingar í fólkaskúlalógini. Høvuðstættirnir í álitinum eru: at stytta skúladagin við færri undirvísingartímum serliga í framhaldsdeildini, at víðka og betra verandi tvílæraraskipan, at tillaga tíma- og lærugreinabýtið við góðari javnvág millum hugvísindi, náttúruvísindi og handaligar og skapandi lærugreinir, og við færri næmingum í flokkinum verður meira læraratíð til hvønn einstakan næming. Við støði í álitinum verður uppskot fyrireikað um broytingar í fólkaskúlalógini. Miðað verður ímóti at dagføra fólkaskúlalógina í fleiri umførum. Fyri at fáa eina samlaða viðgerð av ætlaðu broytingunum í fólkaskúlalógini er ætlanin at skipa fyri aðalorðaskifti í Løgtinginum í heyst. Eisini er ein royndarskipan sett í verk á einum av teimum størru skúlunum fyri at royna fleiri av broytingunum, sum fakligi arbeiðsbólkurin hevur mælt til. Hesar royndir verða tiknar við í tillagingunum, sum ætlanin er at gera í fólkaskúlalógini.

**Sernámsøkið**
Tær sernámsfrøðiligu tænasturnar eru partar av eini størri heild, og tí verða tillagingar á hesum økinum samskipaðar við broytingarnar í fólkaskúlalógini. Álit er handað landsstýrismanninum um børn og ung, sum hava sálarligar avbjóðingar, hetta arbeiði er við í barnaverkætlanini, sum er ein tvørgeiralig tilgongd. Raðfest verður at loysa avbjóðingarnar hjá børnum og ungum við mál- og samskiftistrupulleikum. Ein bráðfeingis loysn til børn við Down-syndromi verður sett í verk, og ein loysn til øll børn og ung við álvarsligum mál- og samskiftistrupulleikum verður fyrireikað. Skúlagarðurin hjá Skúlanum á Trøðni verður nú umvældur.

**Miðnámsskúlaøkið**
Ein nýggj skipan við yrkisgymnasialum útbúgvingum verður fyrireikað, har til ber at fáa sveinabræv og samstundis gymnasialt prógv fyri at kunna lesa víðari. Arbeitt verður við at gera ískoytisútbúgvingar fyri nakrar av útbúgvingunum á miðnámsstigi, sum í dag ikki lúka upptøkukrøvini til ávísar víðari útbúgvingar. Serliga er talan um heilsuhjálpara-, heilsurøktara- og námsfrøðihjálparaútbúgvingarnar á Heilsuskúla Føroya.

Arbeitt verður í løtuni eisini við at kanna, hvussu heilsurøktarar og heilsuhjálparar kunnu fáa løn undir útbúgving. Í næstum verða stig tikin til at umrøða møguleikan fyri at førleikameta uppaftur fleiri ófaklærd á umsorganarøkinum og samstundis tryggja teimum løn, meðan tey eru í skúla. Arbeiðið krevur, at tosað verður við avvarðandi partar, eitt nú kommunurnar, um møguleikarnar.

Frá august 2023 verður royndarskipan fyri næmingar, ið íðka úrvalsítrótt, sett í verk. Endamálið við skipanini er, at til ber at íðka úrvalsítrótt og samstundis taka eina gymnasiala miðnámsútbúgving við vanligari tíð.

Nýggj kunngerð er lýst fyri kokkaútbúgvingina, so at til ber at taka fulla skúlagongd til kokkaútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík. Áður hevur verið neyðugt at taka seinnu skúlaskeiðini í Danmark. Fyrstu næmingarnir byrja eftir nýggju útbúgvingarkunngerðini í august í ár.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Í kjalarvørrinum av uttanhýsis eftirmetingini av Fróðskaparsetri Føroya verða tilmælini nú viðgjørd. Talan er um innanhýsis og uttanhýsis viðurskifti á Setrinum, m.a. eisini við atliti at Bolognatilgongdini, sum nú rættilig ferð er sett á. Ein partur í hesum er eisini tann førleikakarmurin, sum lýsir samanhangin í føroysku útbúgvingarskipanini út frá einum altjóða leisti. Uppskot um lóg fyri førleikakarmin verður liðugt um ársskiftið 2023/2024. Trý samstarvsráð eru sett fyri útbúgvingarnar innan fyri sjúkrarøktarfrøði, fólkaskúlalærara og námsfrøði til tess at styrkja og tryggja samanhang millum útbúgvingarnar og fakøkini, sum útbúgvingarnar fevna um.

**Kampus**
Ognarparturin hjá Tórshavnar kommunu av gamla Venjingarskúlanum er keyptur, og landið eigur nú allan skúlabygningin á Frælsinum. Partur av avtaluni er, at Tórshavnar kommuna skal keypa gamla Studentaskúlan í Hoydølum umframt partar av lendinum á økinum samsvarandi nærri ásettum treytum. Løgtingslógin um at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningin á Frælsinum í Havn er samtykt, og farið er í gongd við umvælingararbeiðið. Ein heildarætlan fyri umvæling og komandi nýtsluna av skúlabygninginum sum partur av Kampus verður fyrireikað. Talan er um fyrsta byggistig í tí stóru kampusætlanini, sum skal fremjast komandi 10 árini. Vinnandi uppskotið av arkitektakappingini til felagsbygning til Kampus er avdúkað, og næsta stig í tí partinum av kampusætlanini er prosjekteringin av felagsbygninginum, ið kann fara í gongd, tá ið fígging er fingin til vegar á fíggjarlógini.

**Føroyskt sum annaðmál**
Í nógv ár hevur undirvísing í føroyskum fyri útlendingar verið fyriskipað innan kommunala geiran og sum serstøk frítíðarundirvísing. Henda skipan hevur virkað væl, og tilflytarar kring landið hava havt møguleika at tekna seg til stutt málskeið, ið hava lagt lunnar undir málsliga og samfelagsliga integratión. Ásannast má tó, at tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál er støðugt vaksandi, og at neyðugt er at byggja upp eina meiri landsfevnandi undirvísingarskipan, har land og kommuna saman støðugt kunnu vera við til, at tilflytarar fáa neyðuga undirvísing í føroyskum. Fyri at náa hesum máli verður arbeitt fram ímóti at tryggja nøktandi lóggávu á økinum, sum skal leggja lunnar undir eina tílíka skipan.

**Gransking**
Nýggja lógin um gransking, menning og nýskapan er sett í verk og er farin at virka. Granskingarráðið kann umsita granskingarjáttanir innan fyri allar geirar og málsøki, so at umsitingin kann sameinast. Gransking og menning hevur verið ein høvuðsháttur í samstarvinum millum Føroyar og ES, síðan Føroyar á fyrsta sinni í 2010 fingu atlimaskap í ES-samstarvsætlanini. Samstarv millum Føroyar og ES um gransking og menning er ein berandi súla undir leikluti Føroya í altjóða granskingarsamstørvum. Í 2017 skrivaðu Føroyar undir millumtjóða sáttmála at styrkja granskingarsamstarvið í Arktis. Og frá 1. januar 2023 hava Føroyar fingið sjálvstøðugan limaskap í stýrinum fyri norðurlendska stovnin Nordforsk.

**Fólkaháskúlar**
Ætlanin er at endurskoða Fólkaháskúlalógina, tí stór menning hevur verið á hesum øki seinnu árini, og tørvur er á at dagføra lógina, ið er frá 1979.

**KT-heildarætlan**
Skúlanet og Kervi+ eru tilsamans KT-heildarætlanin fyri útbúgvingarverkið. Við skúlaneti verður trygdin í øllum skúlum økt til at lúka krøvini um dagsins samfelag. Samstarvað verður við kommunurnar um at lima fólkaskúlarnar inn í Skúlanet. Tað gongst væl við at menna Kervi+, sum verður tikið í brúk á Fróðskaparsetrinum í heyst. Hetta er fyrsta stigið at seta í verk nýggju skipanina, sum verður ment til at fyrisita alt útbúgvingarverkið frá fólkaskúla til fróðskaparsetur.

**Húsarhaldsskúlin**
Byggingin av nýggja húsarhaldsskúlanum í Klaksvík er í gongd. Tað er sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya, ið stendur fyri verkætlanini. Eftir ætlan skal verkætlanin verða liðug í 2024.

**Rásin**
Arbeiðið við um- og útbyggingini av Rásini er farið í gongd, og skúlin fer at fáa búpláss til 7 næmingar afturat. Ein millumbygningur verður bygdur, ið knýtir gamla og nýggja bygningin saman. Í hesum millumbygningi verður m.a. nýggjur køkur gjørdur. Eftir ætlan skal verkætlanin verða liðug á sumri 2025, tá ið skúlaárið byrjar.

**Miðnám á Kambsdali**
Triðja byggistig á Miðnám á Kambsdali er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um útbygging og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlanum á Kambsdali. Hesin parturin av verkætlanini fevnir m.a. um at nýbyggja náttúruvísindaliga økið og útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhøli. Eftir ætlan skal verkætlanin verða liðug á sumri 2025, tá ið skúlaárið byrjar.

**Barnaverndarøkið**
Kannað verður, um skipanin fyri ókeypis umboðan sambært barnaverndarlógini skal víðkast, og stuðulsfólkaskipan fyri foreldur við opnum barnaverndarmáli skal setast í verk. Umhugsað verður at skipa eitt lággáttartilboð, ið veitir vegleiðing til familjur við børnum. Fyrireikað verður at dagføra barnaverndarlógina, m.a. viðvíkjandi fosturforeldraskipanini, sum skal víðkast til at fevna um styrktar og spesialiseraðar fosturfamiljur.

**Barnaverkætlanin**
Sjøtul er settur á Banaverkætlanina, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið stendur fyri í tøttum samstarvi við Kommunufelagið, Løgmálaráðið, Heilsumálaráðið og Almanna- og mentamálaráðið. Partarnir skrivaðu undir eitt politiskt semjuskjal um hesa ætlanina tann 28. mars 2023. Børn og ung, sum hava tørv á hjálp og stuðli fyri at hava viðburð, skulu fáa tær neyðugu veitingarnar og tænasturnar so tíðliga og munadygt sum møguligt. Ein skilagóð fyriskipan skal tryggja sameining og samskipan av fjølbroyttum tænastum, sum ymsir geirar og stovnar veita, soleiðis at teir samvirka til tess at veita so góða tænastu sum møguligt. Tilgongdin skilir seg burturúr flestu almennu verkætlanum á sama øki

og byggir á háttaløg og meginreglur fyri menning frá nýggjastu altjóða granskingini innan fyri strategi og leiðslu hjá tí almenna (Network Public Governance). Hugt hevur eisini verið eftir, hvussu íslendingar arbeiða við somu avbjóðingum.

## BÚSTAÐAR-, ARBEIÐSMARKNAÐAR-, OG UMHVØRVISMÁL

**Arbeiðsmarknaðurin**

Í samfelagnum fyri øll er eingin uttan fyri felagsskapin. Og á rúmliga arbeiðsmarknaðinum hava øll, sum orka og kunnu, eitt gevandi yrki at fara upp til hvønn morgun. Bæði tey, sum kunnu arbeiða fulla tíð, og tey, sum av ymiskum orsøkum arbeiða minni ella eru í vardum starvi. At gera íløgur í at tryggja ein góðan og rúmligan arbeiðsmarknað, har fólkið trívist, gagnar bæði tí einstaka og samfelagnum.

Eitt av høvuðsmálunum hjá samgonguni er at tryggja eftirkomarum okkara somu vælferðartænastur, sum vit hava í dag. Tí mugu vit tillaga skipanirnar soleiðis, at tær bera inn í framtíðina. Eitt neyðugt átak hesum viðvíkjandi er at bøta um umstøðurnar hjá starvsfólkunum á vælferðarøkinum. Vit mugu hava eina burðardygga langtíðarfígging, bøta tænastustøðið, lyfta lønirnar og útbúgvingarnar. Tað eru føgur orð og ovurstórar uppgávur,  men vit hava sum samfelag skyldu til at loysa tær.

Í mong ár hava vælferðarstørvini verið undirlønt. Hetta hevur havt við sær mistrivnað og fráfall á økjum, har vit frammanundan hava trupult at nøkta starvsfólkatørvin. Vit tosa um tey, sum taka sær av okkara dýrabarasta tilfeingi – børnunum og teimum ungu. Vit tosa um tey, sum eru um okkara elstu borgarar. Tey, sum veita røkt og umsorgan, og tey, sum stuðla og lofta, tá ið lívið gongur okkum ímóti. Hetta eru starvsfólk, sum hava uppiborið eina løn, sum samsvarar við ta ábyrgd og útbúgving, tey hava. Tí hava vit sett okkum fyri at geva lægst løntu bólkunum á umsorganarøkinum eitt lønarlyft, sum verður hildið uttan fyri vanligu sáttmálasamráðingarnar. Afturat hesum vilja vit arbeiða fram ímóti at tryggja heilsuhjálparum løn undir útbúgving. Tað fer at geva fleiri møguleika at útbúgva seg til hesa starvsleið.

Eitt annað mál, sum fer at gera stóran mun hjá tí einstaka starvsfólkinum á umsorganarøkinum, er møguleikin at arbeiða fulla tíð. Í løtuni eru fleiri, sum vilja arbeiða meira, men av ymiskum orsøkum kann arbeiðsplássið ikki geva starvsfólkunum henda møguleika. Samgongan hevur sett sær fyri at skipa arbeiðsmarknaðin soleiðis, at øll skulu hava møguleika at arbeiða fulla tíð, um tey vilja tað. Hetta er serliga neyðugt, nú tørvurin á arbeiðsmegi er so stórur á hesum øki, og nú kostnaðarstøðið er vorðið so høgt, at fleiri hava trupult at fáa endarnar at røkka saman, arbeiða tey niðursetta tíð. Hetta skal sjálvsagt gerast í samstarvi við teir myndugleikar og stovnar, sum varða av umsorganarøkinum, m.a. kommunurnar og avvarðandi fakfeløg.

**Stytta arbeiðsvikuna**

Knýtt at hesum er átakið um at stytta arbeiðsvikuna. Tá ið arbeiðsvikan verður stytt, verður munandi lættari hjá arbeiðsgevarunum á umsorganarøkinum at leggja arbeiðsskemaið hjá starvsfólkum sínum soleiðis, at til ber at arbeiða fulla tíð og samstundis lúka krøvini um hvílitíð.

Men tað er ikki einasta orsøkin. Í nógv ár hava sálarfrøðingar rópt varskó, tí vit gerast alsamt fleiri í okkara parti av heiminum, sum eru strongd. Tað er heilt einfalt ov trupult at fáa arbeiðslív og familjulív at hanga saman. Og flestu okkara noyðast at arbeiða fulla tíð fyri at hava ráð til at rinda fyri tak yvir høvdið, rokningar, mat og klæði, sum alt seinastu mánaðirnar er vorðið uppaftur dýrari av broyttu umstøðunum uttan úr heimi. Okkurt má gerast, og vit mugu bera skjótt at.

Tí fór landsstýrið alt fyri eitt undir at stytta arbeiðsvikuna. Royndir aðrastaðni vísa, at styttri arbeiðsvika hevur ómetaliga nógv gott við sær: Starvsfólkini trívast betur og eru minni strongd. Fólk fáa betri stundir til familjuna, og stytt arbeiðsvika gagnar bæði parlagnum og javnstøðuni heima. Og í nógvum størvum gerast fólk produktivari, tá ið arbeiðsvikan verður stytt.

Fyri at finna besta leistin til at stytta arbeiðsvikuna hevur landsstýriskvinnan í arbeiðsmarknaðarmálum sett eitt trípartasamráð. Trípartasamráðið er mannað við fýra umboðum fyri løntakarar og fýra umboðum fyri arbeiðsgevarar, umframt landsstýriskvinnuna við ráðgeva og embætisfólkum. Samráðið umrøður hættir at íverkseta og tillagingar, sum eru neyðugar í sambandi við at stytta arbeiðsvikuna til 37 tímar. Eftir ætlan verður lógaruppskotið um arbeiðsvikuna klárt at leggja fyri Løgtingið í heyst.

**Orku- og veðurlagspolitikkur 2022-2032**

Skiftandi landsstýri hava havt orku- og veðurlagspolitikk á skrá seinastu mongu árini, men tað er ein sannroynd, at alt ov lítið er hent á hesum økinum. Henda samgongan hevur sett sær fyri, at nú skal ferð koma á, og átøk sum muna, skulu fremjast í verki.

Í 2022 varð ein orku- og veðurlagspolitikkur samtyktur í løgtinginum, og landsstýrið arbeiðir nú miðvíst við at seta átøkini í verk. Í ár verða sjey av teimum 25 átøkunum framd. Nevnast kann, at vit hava fingið góðkendar viðskiftatreytir og prísir til smærri vatnorkuverk, mvg-afturberingin til el- og vetnisbilar er longd til og við 2024, oljufýringar verða ikki loyvdar sum upphitingarkelda í nýggjum bygningum, stuðul verður latin fyri at beina burtur oljufýringar, um samstundis verður skift til elrikna upphiting, reglur verða gjørdar um fjarhita og semjan millum landsstýrið og SEV frá 2022 verður eitt nú framd við broytingum í Elveitingarlógini. Meiri vindorka skal bjóðast út, og orkumyndugleikin og SEV eru samd um, hvussu skjótt farast skal fram komandi sjey árini. Eisini verður miðvíst kannað, hvussu elnetið og skipanarberandi tænastur kunnu skipast á skynsamasta hátt.

Komandi ár verður arbeitt við í minsta lagi 10 átøkum. Vit skulu í eina skipaða tilgongd at útfasa F-gass sum kølievni í køli- og frystiskipanum á landi og sjógvi, prísir og viðskiftatreytir skulu gerast fyri uppsetan av sólorkuskipanum á vinnubygningar, sethús og aðrastaðni. Ein óheft orkuvegleiðing skal fáast at rigga, og fokus skal setast á grøna almenna ferðslu og orkuvirkni hjá skipum.

Tað almenna má eisini ganga á odda í samband við orkuskiftið. Tí hevur landsstýrið ásett, at allir almennir bygningar skulu leggja um til varandi orkukeldur og at øll akfør, sum tað almenna keypir, skulu vera elrikin. Eisini verður sjøtul settur á at greina, hvussu eitt $CO_2$-gjald kann skipast, uttan at tað rakar sosialt skeivt. Samgongan vil í øllum arbeiðinum við orku- og veðurlagspolitikki tryggja sær, at eingin dettur niðurímillum. Soleiðis fáa vit eina rættvísa, grøna umlegging.

Umframt arbeiðið við orku- og veðurlagspolitikkinum her heima er neyðugt við altjóða samstarvi á hesum økinum. Havið og veðurlagið fevna tvørtur um landamørk, og tað er umráðandi, at vit standa saman um at basa veðurlagsbroytingunum. Ætlanin er millum annað at vera við á árliga partsfundinum um veðurlagsøkið, COP 28, sum byrjar síðst í november, har landsstýrið serliga fer at fylgja samráðingunum um hav og veðurlag. Hetta er týðandi evni í veðurlagssamráðingunum, sum hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum, sum í stóran mun liva av tí, sum havið gevur okkum.

**Veðurlagslóg**
Veðurlagsbroytingarnar eru av størstu og mest átrokandi avbjóðingunum, sum samfelagið nakrantíð hevur havt. Og veðurlagsbroytingarnar hanga óloysiliga saman við øktu avbjóðingunum, vit hava á náttúru- og umhvørvisøkinum. Í samgonguni síggja vit tað sum okkara skyldu at lata komandi ættarliðum ein burðardyggan heim. Skulu vit røkka hesum máli, mugu vit seta stór krøv til okkum sjálvs.

Við orku- og veðurlagssamtyktini hava Føroyar sett stutttíðarmál at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi, men vit mugu eisini seta okkum langtíðarmál. Tí er ætlanin seint í heyst at leggja fram uppskot til løgtingslóg um veðurlag. Endamálið við veðurlagslógini er at áseta bindandi stutttíðar- og langtíðarmál til tess at minka útlátið, og at Føroyar skulu fylgja altjóða samtyktum og tilmælum. Tað er alneyðugt, at veðurlagsátøkini eru grundað á nýggjastu vitanina á økinum. Harafturat skulu vit regluliga eftirmeta, um málini at minka útlátið eru nøktandi og verða rokkin. Ætlanin er tí at seta á stovn eina ráðgevandi orku- og veðurlagsnevnd við serkønum fólkum at ráðgeva landsstýrinum á orku- og veðurlagsøkinum.

**Nýggj náttúruverndarlóg**
Náttúran tryggjar okkum mat, tilfeingi og umhvørvi at hvíla og løða upp í. Gransking vísir, at tess meira náttúru vit menniskju hava rundan um okkum, tess betur trívast vit. Men vit hava lyndi til at gloyma virðið í náttúruni, og í nógv ár hevur hon verið fyri vanrøkt.

Úti í heimi doyggja hvønn einasta dag fleiri hundrað djóra- og plantusløg út. Skulu vit tryggja eftirkomarum okkara fjølbroytta náttúru, mugu vit gera alt, sum vit kunnu, beinanvegin. Tí var tað ein stórur sigur, tá ið Løgtingið í maimánaði við stórum meiriluta samtykti nýggja náttúruverndarlóg at koma í gildi 1. januar 2024. Síðan aldarskiftið eru fleiri royndir gjørdar at fáa Føroyum tíðarhóskandi náttúruverndarlóg, og hóast tilgongdin hevur verið drúgv, kunnu vit nú fegnast um, at Løgtingið hevur tikið hetta týdningarmikla stigið til at verja og røkja náttúruna við tíðarhóskandi lógarverki.

Náttúruverndarlógin skal røkja fjølbroytnið í náttúruni og tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í føroysku náttúruni – fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki.

Regluverkið um vernd av djóra- og plantusløgum og um økisvernd verður dagført og fjøltáttað, og heimildir verða útvegaðar til at basa hóttanini frá fremmandum lívverum. Til at sita fyri lógini verður skipað ein faklig náttúrufyrisiting undir landsstýrisfólkinum.

Náttúruverndarlógin er í stóran mun ein heimildarlóg, og tí liggur nú stórt arbeiði fyri framman at fylla lógarkarmarnar út við kunngerðum til at fremja endamálini í lógini. Somuleiðis liggur eitt týðandi

arbeiði fyri framman at útvega vitanargrundarlagið, sum krevst til munadygga náttúruvernd. Hetta er ein fyritreyt fyri, at lógin fæst at virka eftir endamálinum.

Men uppgávan at tryggja, at øll føroysk náttúra verður umsitin burðardygt, røkkur tvørtur um geirar. Alt landsstýrið má taka neyðug stig til, at fyrilit fyri burðardyggari náttúruumsiting vinna frama í lóggávu og umsiting, sum ber við náttúruna.

Til at fremja og varpa ljós á Føroya skyldur at tryggja burðardygga náttúruumsiting fer landsstýrið í næstum at samtykkja ein felags politikk fyri burðardygga náttúruumsiting. Við nýggja náttúrupolitikkinum fer tað at liggja á hvørjum landsstýrisfólki sær at tryggja, at lagt verður upp fyri burðardyggari náttúruumsiting í lóggávu og umsiting, sum viðkomandi landsstýrisfólk varðar av.

**Bústaðarmál**

Bústaðarpolitikkur er vælferðarpolitikkur, og í Føroyum skulu øll hava eitt trygt og gott heim. Hetta er greiða fatanin hjá landsstýrinum, sum beinanvegin er farið undir at tryggja fleiri og fjølbroyttari bústaðarmøguleikar. Eitt tað fyrsta, sum varð sett á skrá, var at broyta løgtingslógina um Húsalánsgrunn, so at kravið um, at Bústaðir skuldu samstarva við privatar íleggjarar um bústaðaverkætlanir, varð strikað. Lógarbroytingin ger, at Bústaðir lættari sleppa í gongd við verkætlanir, tí privatir íleggjarar ofta hava størri áhuga fyri at keypa seg inn í eina lidna ella nærum lidna verkætlan, heldur enn at vera við frá byrjan.

Arbeitt verður eisini við at fyrireika lóggávu, sum skal gera tað møguligt hjá kommunum saman við Bústøðum at stovna og reka almannagagnlig bústaðarfeløg. Við hesum kemur væntandi ferð á almennu bústaðarbyggingina kring landið. Hetta slagið av bústaðarfeløgum hevur til endamáls at byggja gott, men bíligt og uttan stórt vinnuligt avkast.

Eisini er arbeiðið í gongd við at fyrireika lóggávu, sum skal heimila kommunum at áseta bústaðarskyldu í samband við nýggjar kommunalar byggiætlanir. Miðað verður eftir, at lógaruppskot um almannagagnlig bústaðafeløg og lógaruppskot um bústaðaskyldu verða løgd fyri løgtingið í heyst. Hesi átøk fara væntandi eisini at hava við sær, at uppaftur fleiri fáa tak yvir høvdið.

## ÚTLENDINGA– OG LÓGARMÁL

**Útlendingamál**

Nógvir útlendingar koma til Føroyar at arbeiða, og seinasta árið eru nógvir komnir gjøgnum snarskipanina (Fast-Track). Hetta hevur fleiri avbjóðingar við sær á útlendingaøkinum, m.a. at tryggja nøktandi eftirlit við arbeiðs-og uppihaldsloyvum umframt at tryggja, at viðurskiftini hjá útlendsku arbeiðsmegini eru í lagi. Nógvir útlendingar hava eisini familjuna við sær til Føroya, og hetta setir stór krøv til dagstovnar, skúlar o.a. fyri at kunnu lofta hesum børnum.

Talið á útlendingum, sum koma til Føroya sum samfylgjandi familja hjá einum útlendingi við vinnulig-um uppihaldsloyvi, er meira enn tvífaldað, síðan snarskipanin varð sett í verk í november 2021. Í 2021 vóru tað sostatt 48 útlendingar, ið komu higar sum samfylgjandi, meðan talið í 2022 var vaksið til 118.

Seinastu 5 árini hava tilsamans 124 vaksin fingið uppihaldsloyvi sum samfylgjandi hjá einum arbeiðstakara, sí talvuna niðanfyri:

| Samfylgjandi vaksin | |
|---|---|
| **Árstal** | **Tal á persónum** |
| 2018 | 15 |
| 2019 | 23 |
| 2020 | 20 |
| 2021 | 26 |
| 2022 | 40 |
| **Tilsamans** | **124** |

*Kelda: Udlændingestyrelsen og SIRI*

Seinastu 5 árini hava tilsamans 169 børn fingið uppihaldsloyvi sum samfylgjandi hjá einum arbeiðs-takara, sí talvuna niðanfyri:

| Samfylgjandi børn | |
|---|---|
| **Árstal** | **Tal á børnum** |
| 2018 | 20 |
| 2019 | 30 |
| 2020 | 19 |
| 2021 | 22 |
| 2022 | 78 |
| **Tilsamans** | **169** |

*Kelda: Udlændingestyrelsen og SIRI*

Landsstýrið viðger avbjóðingar, ið eru á arbeiðsmarknaðar- og útlendingaøkinum. Arbeitt verður m.a. við at seta krøv til inntøkuna hjá útlendingum, sum vilja hava familjuna við sær til Føroyar, til tess at tryggja, at útlendingurin er førur fyri at uppihalda familjuni og tryggja teimum sømilig livikor her.

Eisini arbeiðir landsstýrið við at seta í verk skipan, sum heimilar Útlendingastovuni at avgreiða arbeiðsloyvi í Føroyum. Hetta arbeiðið er komið í drag orsakað av, at tað ikki er avklárað við ríkismyndugleikarnir, hvørja KT-skipan Útlendingastovan skal brúka. Landsstýrið ætlar at fáa hetta uppá pláss í hesi tingsetuni.

**Integratión**

Landsstýrið ætlar at leggja lógaruppskot um integratión fyri Løgtingið í komandi tingsetu. Yvirskipað eigur ein integratiónslóg at fevna um málfrálæru, kunning og ymisk integratiónstiltøk. Høvuðsdenturin í integratiónslógini eigur at leggjast á tey, sum ætla at verða verandi í Føroyum. Lógin eigur at fevna um tilboð og krøv um frálæru í føroyskum. Um krav skal setast um málsligar førleikar og kunnleika til føroyska samfelagið í sambandi við varandi uppihaldsloyvi, so er neyðugt, at tilboðið er sett soleiðis saman, at øll hava møguleika at vera við. Tað krevur m.a. at lagt verður upp fyri at fólk sigla og arbeiða skiftisarbeiði.

Eisini er neyðugt at kunnað verður væl um rættindi og skyldur í føroyska samfelagnum. Tí eigur lógin at fevna um ymisk integratiónsátøk. Umhugsað eigur eisini at verða, hvussu føroyska samfelagið fær gagnnýtt vitan og útbúgving hjá útlendingum til fulnar.

Tað kann eisini hava stóran týdning hjá útlendingum, sum koma til Føroya at arbeiða, at duga føroyskt og kenna rættindi og skyldur. Hetta kann eitt nú hava týdning fyri trygd á arbeiðsplássinum. Tað er eisini ein sannroynd, at nógv, sum koma til Føroya at arbeiða, seinni velja at verða verandi. Tí eigur hesin bólkurin eisini at fáa tilboð um m.a. málfrálæru.

Tá ið tað kemur til flóttafólk, so er ætlanin, at tey skulu aftur til sítt heimland, tá ið tað er gjørligt. Eingin veit tó, hvussu langa tíð tað kann taka, og tað gevur tí meining at bjóða hesum bólki integratiónsfremjandi tiltøk.

Fyri allar bólkar er tað serliga týdningarmikið at tryggja, at børn og ung sum koma til Føroya, fáa góða málfrálæru og verða integrerað í føroyska samfelagið. Um tey ikki læra mál og siðir, kann tað ganga út yvir trivnaðin. Hetta kann fáa óhepnar avleiðingar fyri alt samfelagið í longdini.

**Flóttafólk úr Ukraina**

Í apríl 2022 samtykti Løgtingið einmælt eitt uppskot um at taka ímóti flóttafólkum úr Ukraina.

Higartil (13. juni 2023) hava 144 persónar fingið uppihaldsloyvi eftir serligu Ukrainalógini. Tað koma framvegis ukrainsk flóttafólk til Føroyar. Eftir serligu Ukrainalógini kunnu vit taka ímóti 200 flóttafólkum.

Fleiri myndugleikar eru partar av arbeiðinum at taka ímóti flóttafólkum úr Ukraina. Fyri at tryggja samanhang í arbeiðinum hevur landsstýrið sett eina samskipandi eind á økinum. Í samskipandi eindini sita umboð fyri Løgmálaráðið, Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Almannaverkið, Útlendingastovuna, Kommunufelagið, Føroya Politi og Reyða Kross.

Sum heild hevur tað gingið væl at taka ímóti ukrainsku flóttafólkunum, men tað hevur kravt nógv av almennum myndugleikum, kommunum og av eitt nú Reyða Krossi. Saman við Útlendingastovuni hevur Reyði Krossur lagt nógv fyri at finna bústaðir til ukrainar, og hetta hevur sum heild eydnast væl, tó at tað ikki altíð ber til innan fyri teir fimm dagarnar, sum málið annars er. Tað kemur tí fyri, at persónar búgva longur í móttøkuhúsinum enn ætlað. Útlendingastovan hevur tí leigað eini hús, sum persónar kunnu búgva eitt sindur longur í, meðan leitað verður eftir varandi bústaði.

**Neyðhjálp til Ukraina, Sýria og Turkaland**
Landsstýrið læt í vár 500.000 kr. í neyðhjálp í sambandi við jarðskjálvtarnar í Sýria og Turkalandi. Neyðhjálpin varð latin ígjøgnum Reyða Kross Føroyar.

Harumframt læt landsstýrið í februar 7 mió. kr. í neyðhjálp til Ukraina, sum varð latin gjøgnum ST flóttafólkastovnin UNHCR. Hetta er størsta einstaka upphædd, sum Føroyar higartil hava latið í neyðhjálp. Landsstýrið arbeiðir við at skipa ein leist at stuðla ítøkiligum átøkum og verkætlanum í Ukraina, ið hava langskygdan, strategiskan týdning í sambandi við at byggja landið uppaftur. Ætlanin er, at í minsta lagi 10 mió. verða latnar Ukraina næsta ár.

**Norðurlandamál**
Føroyar hava fingið fullgildigan limaskap í NordForsk fyrr í ár. Arbeitt verður somuleiðis við at fáa fullgildigan limaskap í Nordic Innovation og øðrum norðurlendskum stovnum. Hetta er við til at fyrireika okkum til at gerast veruligur limur í Norðurlandaráðnum og Norðurlanda Ráðharraráðnum, soleiðis sum Føroyar leingi hava ynskt.

Arbeitt verður við at styrkja føroysku luttøkuna í norðurlendska samstarvinum í øllum liðum og á øllum stigum, og at samskipa hetta arbeiðið í størst møguliga mun. Tað verður gjørt fyri at brynja okkum stigvíst til at taka við størri ábyrgd og vísa í verki, at Føroyar eru førar fyri at gerast fullgildigur limur í norðurlendska samstarvinum.

**Broyting í Útlendingalógini viðvíkjandi Schengen**
Í 2001 blivu Danmark og hini Norðurlondini partur í Schengen-samstarvinum. Føroyar eru ikki partur av Schengen-samstarvinum men avtalað er við Schengen, at ytra Schengen-markið hjá Danmark fevnir um Føroyar og Grønland, soleiðis at vit kunnu ferðast frítt til hini Norðurlondini og til londini í Schengen-samstarvinum, t.e. uttan at vísa pass við landamørkini inn í Schengen.

Í tingsetuni 2022 samtykti Løgtingið broytingar í útlendingalógini soleiðis, at lóggávan viðvíkjandi eftirliti við innferð og fráferð í Føroyum verður tann sama sum í Schengen-samstarvinum. Hetta var neyðugt at gera, um vit framhaldandi skuldu varðveita støðuna at kunna ferðast frítt til hini Norðurlondini og til londini í Schengen-samstarvinum, og fyri at ferðafólk úr Schengen-londunum eisini skulu kunna ferðast frítt til Føroyar. Hetta var ein týðandi broyting serstakliga fyri ferðavinnuna.

**Broyting gjørd í Ukrainalógini**
Í apríl mánaði í 2022 samtykti Løgtingið ríkislógartilmæli um ígildissetan av Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om midlertidig opholdtilladelse til personer, der er fordrevet fra Ukraine. Endamálið við lógini er at veita persónum, sum eru riknir burtur úr Ukraina, eftir at russiskar herdeildir gjørdu innrás í landið tann 24. februar í ár, møguleika at fáa fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum.

Í tingsetuni 2022 samtykti Løgtingið tvær broytingar í lógini. Fyrra broytingin var, at persónar kunnu fáa uppihaldsloyvi, um teir eru farnir úr Ukraina tann 1. februar 2022 ella seinni. Seinna broytingin var, at freistin frá tí, at fyribils uppihaldsloyvi er játtað, og til føroyskir almennir myndugleikar hava ábyrgd av viðkomandi, varð broytt frá fýra døgum til fýra gerandisdagar.

**Dagføring og føroyskan av revsilógini (tingseturnar 2016–2023)**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa alla revsilógina dagførda og á føroyskum máli.

Í tingsetunum 2016-2021 vórðu reglurnar í kap. 12-29 í revsilógini dagførdar, nútíðargjørdar og orðaðar á føroyskum. Í komandi tingsetu er ætlanin at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um at dagføra kap. 1-11 í revsilógini, sum er almenni parturin av revsilógini. Eftir hetta er øll revsilógin orðað á føroyskum.

Ætlandi verða eisini ymiskar aðrar broytingar gjørdar í revsilógini í hesi tingsetuni, so sum at seta inn § 119 a um chikanu móti almennum starvsfólki, § 216, stk. 2 um kynslig brotsverk móti børnum, § 242 um tráfylging, § 243 um sálarligan harðskap, § 244, stk. 2 um harðskap, § 264 e um samleikastuldur, § 299 c viðvíkjandi brotum á kappingarlóggávuna. Harumframt er ætlanin at broyta revsilógina í heyst, so ásetingar koma inn í lógina um grooming og sextortion.

**Nýggj lóg um revsifullgerð og skipan við fótfjøtri setast í verk**
Gjørd er serstøk lóg um revsifullgerð fyri Føroyar. Endamálið við lógini um revsifullgerð er fyrst og fremst grundsjónarmiðið um, at revsifullgerð og serstakliga frælsisrevsing er eitt so inntrívandi rættarøki, at reglurnar á økinum eiga at verða gjørdar við lóg og ikki við fyrisitingarligum reglum.

Eitt annað endamál við lógini er at bøta munandi um møguleikan hjá revsifullgerðarmyndugleikunum í Føroyum at røkja sínar uppgávur í sambandi við revsifullgerð. Hetta er galdandi t.d. fyri kunningartøkni, dátuvernd og møguleika at finna fram upplýsingar í sambandi við parlamentariskt eftirlit við myndugleikaútinnanini umframt í teimum verkligu mannagongdunum í sambandi við mongu avgerðirnar, sum verða tiknar við heimild í lógini. Lógin kom í gildi 1. juli 2023.

Í hesi tingsetuni er ætlanini at gera broyting í nýggju revsifullnaðarlógini, sum skal heimila, at skipan við fótfjøtri verður sett í gildi fyri Føroyar umleið 2024/2025.

**Nýtt fongsul byggjast í Føroyum**
Fyrireikingarnar at byggja nýtt fongsul í Føroyum eru byrjaðar. Í mars beyð Løgmálaráðið øllum kommununum til eina kunning í sambandi við, at tær vórðu bidnar at boða landsstýrinum frá, um tær høvdu áhuga fyri at bjóða øki út til nýggja fongslið. Tá ið freistin var farin 1. juni, høvdu nýggju

kommunur víst á møgulig øki. Tær eru: Tvøroyrar kommuna, Eiðis kommuna, Kvívíkar kommuna, Tórshavnar kommuna, Sunda kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Vága kommuna, Nes kommuna og Eysturkommuna. Landsstýrið hevur sent danska Løgmálaráðnum uppskotini, og nú skal støða takast til, hvør staðseting er tann besta til nýggja fongslið. Landsstýrið er við í hesum arbeiðinum.

**Broyting av konkurslógini**
Løgtingið samtykti í tingsetuni 2021 eitt ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse ændringer i konkursloven m.v. Broytingarnar snúðu seg í høvuðsheitum um at seta reglur um endurskipan (rekonstruktion) og trotabúsbann (konkurskarantæne) inn í føroysku konkurslógina. Seinasta dagføringin av donsku konkurslógini var ikki partur av ríkislógartilmælinum, sum Løgtingið samtykti í tingsetuni 2021. Tí varð eitt nýtt ríkislógartilmælið lagt fyri Løgtingið, soleiðis at seinasta dagføringin er við, tá ið broytingarnar í konkurslógini fyri Føroyar koma í gildi tann 1. september 2023. Seinasta dagføringin snýr seg í høvuðsheitum um at tillaga reglurnar um endurskipan og um at broyta reglurnar um varnarting í skuldarumskipanarmálum.

**Broyting í rúsdrekkalógini**
Landsstýrið ætlar í hesi tingsetuni at gera broyting í rúsdrekkalógini, sum hevur til endamáls at loyva rúsdrekkaframleiðarum í Føroyum at selja egna framleiðslu í egnum sølubúðum, og sum skal loyva matstovum at flyta inn vín og øl beinleiðis, heldur enn gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins.

**Endurskoðan av fosturtøkulógini**
Galdandi lóg um fosturtøku er frá 1956 og er á mangan hátt ótíðarhóskandi. Nógv kjak hevur staðist av lógini, og tíðin er nú komin til at endurskoða lógina og gera hana meira tíðarhóskandi.

Fyrireikingararbeiðið er farið í gongd, og farið er undir at at lýsa málið nærri. Løgmálaráðið fer í hesum sambandi at hava fundir við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið kunnu metast at hava týðandi vitan ella áhuga fyri arbeiðinum, eins og ætlanin er at kanna betur, hvussu okkara norðurlendsku grannar hava skipað sína lóggávu á økinum. Tað kann taka nakað av tíð at endurskoða lógina og at gera nýtt lógaruppskot, men tað verður raðfest.

**Tilbúgving**
Yvirskipað er tørvur er á munadyggari og tvørgangandi tilbúgvingarsamskipan, sum megnar at greina føroysku hóttanarstøðuna, byggja upp vitanarsambond við aðrar norðurlendskar tilbúgvingarmyndugleikar og hava virknan leiklut í at tryggja, at landsmyndugleikar og kommunali geirin lyfta økisábyrgdina á ein samskipaðan og samvirkandi hátt.

Ætlanin er í fyrstu syftu at dagføra tilbúgvingarlógina við einum kapitli um kreppustýring, so at karmarnir rundanum Átaksráðið og Kreppuráðið kunnu skipast við kunngerð. Eisini er ætlanin at broyta ásetingarnar um tilbúgvingarráðið, soleiðis at millum annað samansetingin av ráðnum heldur kann verða ásett í kunngerð.

**Heimild til kommunur at taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi**

Landsstýrið ætlar at koma við uppskoti til løgtingslóg, sum hevur til endamáls at heimila kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi. Í nøkrum kommunum eru nógv tóm hús, sum í mestan mun verða brúkt sum frítíðarhús av fólki, sum ikki býr í kommununi. Ein kommuna hevur skyldu at veita øllum húsum vatnveiting, kloakkering, renovatión o.tíl. Fyri eina lítla kommunu við nógvum tómum húsum og frítíðarhúsum kann tað vera rímiligt, at kommunan kann taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi og tí ikki gjalda skatt til kommununa.

**Lógardygd**

Øll lógar- og kunngerðauppskot skulu eftirkannast av lógartænastuni í Løgmálaráðnum, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Eisini verður ein ársfrágreiðing um eftirkanning gjørd, hvørs endamál er at upplýsa stjórnarráðini um tað, sum lógartænastan í síni eftirkanning er komin fram á, og sum verður hildið at hava almennan áhuga hjá øllum stjórnarráðunum.

**Rundskriv um lógarsmíð.**

Arbeitt verður við at dagføra rundskrivið um lógarsmíð, sum kom í gildi 1. januar 2019. Ætlanin er, at dagført rundskriv skal koma í gildi 1. januar 2024.

# LØGLISTI 2023

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at yvirtaka málsøkið sjórættur. Talan er um lóggávu á málsøkinum hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum. UVMR fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Ætlanin er, at málsøkið verður tikið yvir frá 1. januar 2025 at rokna. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla – eftirlit við loftrúminum)**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at yvirtaka málsøkið flogferðsla. Talan er um lóggávu á málsøkinum hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum. UVMR fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Ætlanin er, at lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið í vár, og at málsøkið verður tikið yvir frá 1. januar 2026 at rokna.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um Anordning om ikrafttræden for Færøerne af partistøtteloven**
Í fleiri ár hava flokkarnir í Føroyum, sum hava stillað upp til fólkatingsval, fingið stuðul til sítt virki eftir donsku partistøtteloven, uttan at hon tó hevur verið formliga sett í gildi í Føroyum. Nú er komið eftir, at tað krevst, at lógin verður formliga sett í gildi í Føroyum, fyri at flokkarnir kunnu fáa sín stuðul. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um Anordning om delvis ikrafttræden for Færøerne af lov om MitID og NemLog-in**
Endamálið við uppskotinum er at skapa neyðuga lógagrundarlagið fyri, at Ríkisumboðið kann veita føroyingum atgongd til MitID og NemLog-in, ið er komið í staðin fyri Nem-ID skipanina. Tað er fyrst og fremst ætlað at nýta til telduskipanir í Danmark, har hetta er krav. Tað gagnar serliga teimum, ið ætla sær undir lesnað, ella teimum, ið fara til Danmarkar í sjúkraørindum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2024**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýriskvinnan fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2025–2029**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýriskvinnan leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
Lógin skal hava eina fyriskipan um fíggjarpolitiska stýring av almenna búskapinum. Aðrar broytingar í lógini fevna um neyðugar tillagingar og nágreiningar, nýggj játtanarsløg, møguleikan fyri at flyta avlop og hall fram v.m. Broytingarnar eru eitt nú knýttar at broytingunum í lógini um landsins almenna roknskaparhald og kunngerðini um roknskaparverk landsins, t.d. um avskrivingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald o.a.**
Tillagingar verða gjørdar í lógini í samsvari við broytingar í lógini um landsins játtanarskipan. Serliga verða broytingar gjørdar í kunngerðini um roknskaparverk landsins. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

*Skattir, avgjøld o.a.*

**Løgtingslóg um avgjøld á innflutningi og framleiðslu (avgjøld á f-gass)**
Føroyar hava bundið seg til at minka nýtsluna av f-gassi við 85 % fram til 2036. Innflutningur av f-gassi verður framvegis loyvdur, men í einari kvotuskipan, har kvoturnar minka stigvíst næstu 14 árini. Uppskotið er partur av orku- og veðurlagspolitikkinum, ið Løgtingið samtyktið í 2022. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um skráseting av akførum (hækka burturbeiningargjaldið á akfør)**
Endamálið er at endurskoða skrásetingargjaldið á dýrum elbilum. Ætlanin er harumframt at hækka burturbeiningargjaldið á ávísum akførum, sum eru kostnaðarmikil at beina burtur, og at endurskoða afturrindan av skrásetingargjaldinum.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (AMEG)**
Endamálið er at laga føroyska lóggávu til altjóða skyldur. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**
Samgongan ætlar at geva ein skattalætta til lág- og miðallønt. Ætlanin er at lækka inntøkuskattin við at dagføra skattastigan, so at serliga markskatturin hjá miðinntøkum lækkar og fólk við vanligum størvum fáa meira burturúr við at arbeiða fulla tíð. Til at fíggja skattalættan er neyðugt at gera broytingar í aðrari lóggávu. Í sambandi við lønarlyftið skal pensjónistafrádrátturin umskipast, soleiðis at landið letur allan frádráttin, og kommunurnar brúka sparda frádráttin til at rinda fyri lønarlyft hjá ávísum starvsfólkum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broytingar í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin)**
Endamálið við uppskotinum er at herða krøvini í § 1 soleiðis at ásetingin verður samsvarandi átaki 5 í altjóða BEPS-samstarvinum (Base Erosion and Profit shifting), sum snýr seg um at handfara skattasiðvenjur á virknari hátt við atliti at gjøgnumskygni og innihaldi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. (Avskrivingarlógin)**
Endamálið við uppskotinum er at gera neyðugar dagføringar av avskrivingarlógini. Galdandi avskrivingarlóg er frá 1971, og seinasta broytingin varð gjørd í 2001. Verandi lóg hevur t.d. ongar ásetingar um avskrivingar av vindmyllum og størri samferðsluverkætlanum. Greiðari ásetingar skulu gerast um bygningar, ið verða nýttir til Airbnb, eins og tørvur er á at endurskoða treytirnar fyri eitt nú íbúðarbygningar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til skattaeftirlitslóg o.a.**
Uppskotið gevur TAKS eina generella heimild um atgongd til viðkomandi almennar skipanir sum liður í arbeiðinum at fremja eitt nútíðarligt skattaeftirlit. Heimildirnar verða, saman við verandi revsiheimildum, savnaðar í eini lóg um skattaeftirlit o.a. Generellar ásetingar fyri renturokningar, avrundingar, innheintingarheimildir, ómaksgjøld o.a. verða somuleiðis dagførdar og ásettar í hesi lóg. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin)**
Uppskotið kemur eftir tilmæli frá TAKS. Talan er um broytingar um tíðaravmarkað starv, depotkonti og heimild at flyta eftirløn. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt**
Høvuðsendamálið við uppskotinum er at tryggja, at Føroyar halda sínar altjóða skyldur við atliti at Global Forum og IF BEPS. Gjøgnumskygni skal tryggjast og trygt umbýti av skattaupplýsingum. Harumframt er eitt av endamálunum at útvega TAKS heimild at fara á eftirlitsvitjan hjá peningastovnunum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald**
Talan er um dagføringar og leingjan av grønum loysnum, sum t.d. hitapumpum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)**
Neyðugt er at gera broytingar í grein 7, sum ásetir avsláttur í veiðigjaldinum, um kvoturnar eru serliga lágar. Seinastu tíðina, tá ið eingin semja hevur verið um fiskiskapin av uppsjóvarfiski, eru smærri fyribilskvotur lýstar í kunngerð, og síðani eru tær lýstir við endaligu kvotunum. Verandi orðingar í lógini eru knortlutar og mugu broytast soleiðis, at til ber at fyrisita eftir lógini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

*Talgilding*

**Løgtingslóg um Talgildingarmyndugleika**
Vísandi til tilmælir frá Vakstrarforum, heildarætlan fyri talgilding og netverjuætlan fyri Føroyar, eigur ein talgildingarmyndugleiki at verða skipaður í lóg. Myndugleikin skal hava samstarv við tað privata og skal tryggja eina felags talgilda kós fyri landið. Netverja er við tíðini eisini vorðin ein týðandi partur

av talgildingini. Myndugleikin skal tryggja, at talgilding og allar skipanir hjá tí almenna hava neyðugu netverjuna. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

## FISKIVINNU – OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
Reglurnar um brúksskyldu á loyvum og veiðirættindum verða tillagaðar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um kóp (Kópalógin)**
Eingin lóg er í Føroyum um kóp. Lógaruppskotið verður gjørt fyri at skipa kópaveiðu við Føroyar. Alt havsins tilfeingi eigur at verða varðveitt og gagnnýtt burðardygt, lívfrøðiliga og búskaparliga. Ein umsitingarætlan eigur at verða gjørt fyri føroyska kópastovnin, og metingar skulu gerast um, hvussu stórur stovnurin er. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um fyrisiting av sjófeingi**
Sambært sjófeingislógini leggur landsstýrismaðurin, áðrenn 20. februar á hvørjum ári, fyri Løgtingið frágreiðing um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í februar.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (Ferðslulógin)**
Ætlanin er at gera ymiskar broytingar í ferðslulógini. Eitt nú broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól. Eisini er ætlanin, at skeiðið í rúsdrekka og ferðslu frameftir eisini skal fevna um rúsevni. Haraftrat er ætlanin at seta bann fyri nýtslu av øðrum smáum motordrivnum akførum, t.d. rennihjólum, á øki, har ferðslulógin er galdandi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

*Vinnumál*

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í útbjóðingarlógum**
Endamálið er at gera broytingar í útbjóðingarlógunum til leiting eftir kolvetni, soleiðis at peningaupphæddir, sum oljufeløg í sambandi við útbjóðingarumførini hava rindað til ávís endamál, kunnu verða gagnnýttar til at gera jarðfrøðiligar kanningar í sambandi við orkuskiftið. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagaslógin) og í Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin)**
Vinnufelagslógin og vinnufyritøkulógin verða broyttar soleiðis, at kapitalfeløg og ávísar vinnurekandi fyritøkur frameftir regluliga kanna, um broytingar eru í eigaraviðurskiftum felagsins. Skráseting Føroya skal kunna taka fyrisitingarlig stig, um eigaraupplýsingar ikki verða latnar, ella umsitingargjald ikki verður rindað rættstundis. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi "Kongelig anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring av søloven"**
Endamálið er at dagføra sjólógina soleiðis, at lógin er dagførd samsvarandi lóggávuni í hinum Norðurlondunum, og at lógin er dagførd, fyri ætlaðu yvirtøkuna í 2025. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum**
Kravið um, at eitt nýtt partafelag ella smápartafelag skal stovnast til hvørja framleiðslu, sum fer at søkja um afturbering, verður strikað. Komið er eftir, at kravið um nýtt felag er óneyðugt, tí eftirlitið kann eins væl røkkast við verkætlanarroknskapi fyri ta ítøkiligu framleiðsluna. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Broyting í løgtingslóg um djóravælferð**
Tørvur er á gera ávísar broytingar, m.a. í reglunum um vinnuligt djórahald, í heimildunum hjá myndugleikanum at geva boð, tá ið talan ikki er um vinnuligt djórahald, og í revsireglunum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Anordning om ikraftttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om luftfart**
Loftferðslulógin, galdandi fyri Føroyar, verður dagførd. Tá ið hesar dagføringar eru samtyktar, er loftferðslulógin, galdandi fyri Føroyar, fult dagførd. Talan er um eina ørgrynni av broytingum, sum stava frá fimm ymiskum donskum broytingarlógum í lógini um flogferðslu. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um gongd í haga og at skipa ferðavinnuna kring landið**
Viðurskiftini um gongd í haga og ferðavinnu kring landið verða skipað við lóg. Ætlanin er, eftir eitt skjótt umfar av samrøðum við ymiskar partar (ferðavinnu, landbúnað, áhugafeløg og kommunur), at umrøða ætlaðu loysnina við allar flokkar á tingi í heyst. Uppskotið verður væntandi klárt at leggja fyri Løgtingið í vetur.

**Uppskot til broytingar í løgtingslóg um landsjørð**
Ætlanin er m.a. at broyta løgtingslógina um landsjørð. Evnini, sum væntandi verða tikin upp í lógaruppskotinum, verða at verja landbúnaðarjørð, at endurskoða reglurnar um sølu av festibrøvum og at víðka heimildirnar fyri, hvat festikonta kann nýtast til. Eisini er ætlanin at kanna spurningin um

persónligt veðhald, tá ið rakstur av festi verður skipaður í partafelag. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broytingar í løgtingslóg um Búnaðargrunn**
Ætlanin er at víðka møguleikarnar hjá Búnaðargrunninum at fíggja verkætlanir, sum menna landbúnaðarvirksemið á festinum, men sum eisini gera tað lættari hjá Búnaðargrunninum at stuðla undir landbúnaðar- og matvørupolitikkin, sum dettur verður út í kortið. Broytingarnar gera tað møguligt hjá festarum at fara undir átøk, sum økja um inntøkumøguleikarnar hjá festinum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum**
Løgtingið samtykti í vár at taka yvir málsøkini, sjóuppmerking og vitaverk frá 1. juni 2024 at rokna. Í hesum sambandi verður neyðugt við heimildum at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar, undir hesum vitar og føst og flótandi siglingarmerki, sum vegleiða sjóferðslu. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot um broyting í løgtingslóg um kapping**
Tá ið Løgtingið í vár samtykti nýggja lóg um kapping, var greitt, at ásetingarnar um revsing skuldu endurskoðast, m.a. fyri luttøku í kartellvirksemi. Eisini er ætlanin at gera ásetingar um eftirlit við prísum á føroyska marknaðinum.  Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Lóg um nettrygd**
Nettrygdarlógin skal lógarfesta krøv, sum samsvara við nýggjastu felags evropeisku NIS2 fyriskipanina, sum m.a. hækkar trygdarstøðið og styrkir net-kreppustýringina, økir um mótstøðuførið og minkar um avleiðingarnar, tá ið álop henda. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om restrukturering og afvikling af visse finansielle virksomheder**
Við uppskotinum verður lógin dagførd og BRRD II direktivið verður sett í verk í Føroyum. Henda lógin ásetur, hvussu farast skal fram, tá ið peningastovnar koma sær í óføri, og hvussu myndugleikabýtið er skipað, serliga millum Fíggjareftirlitið og Fíggjarligt Støðufesti. Ríkislógartilmælið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging**
Talan er um dagføring av tryggingarlógini, m.a. áseting av reglum um kravt talgilt samskifti og varskógvaraskipan. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskráseting**
FAS lógin verður endurskoðað. Ætlanin er m.a. at kanna og broyta krøvini til eigarar, soleiðis at krøvini kunnu líkjast teimum í DIS. Eisini verður álagt umboðsfólkum fleiri skyldur, tá ið tey skráseta skip í FAS. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um løggilding av handverksmeistarum í byggivinnuni**
Ætlanin er at gera eina skipan, soleiðis at handverksmeistarar, sum bjóða seg fram at byggja fyri onnur, eru løggildir og hava staðið ta útbúgving, sum verður kravd fyri at gerast løggildur handverksmeistari. Eisini kunnu hugsast krøv um trygging ella trygd, tá ið bygt verður fyri privatar borgarar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

*Uttanríkismál*

**Uppskot til samtyktar um trygdarpolitikk**
Trygdarpolitiska støðan er grundleggjandi broytt. Tí er tørvur á einum miðvísum føroyskum trygdar- og verjupolitikki, sum breið politisk semja er um. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum hevur í hyggju at leggja eitt uppskot til samtyktar um trygdarpolitikk fyri Løgtingið í komandi tingsetu. Grundarlagið fyri trygdar- og verjupolitisku kósini hjá landsstýrinum er tryggleikin hjá Føroya fólki og at verja ta vælferð og tær samfelagsskipanir, sum hava týdning fyri føroyska fólkaræðið. Føroyar skulu virka miðvíst fyri, at friður og støðufesti valda, og í felag við sameindum vera við til at lyfta ta byrði, sum ein óvissari heimsstøða ber í sær. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini um Føroyar í Arktis**
Undanfarna landsstýrið evnaði til uppskot um arktiskan politikk undir heitinum Føroyar í Arktis. Arktiski politikkurin hevur ikki verið til umrøðu í løgtinginum. Hetta verður nú gjørt, og frágreiðingin verður løgd fyri tingið í heyst.

**Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini um uttanríkispolitikk**
Ætlanin er at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um uttanríkispolitikk komandi vár. Talan verður um eina stutta frágreiðing, sum leggur dent á mest týðandi uttanríkispolitisku málini og avbjóðingarnar. Frágreiðingin verður klár at leggja fyri tingið í mars 2024.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um vevnaðarskrá, genomskrá, diagnosuskrá og ættarbandsskrá til gransking og persónlagað medisin (ílegulógin II)**
Ílegulógin kom í gildi í 2005. Lógin hevur 18 ár á baki og er endurskoðað, og uppskot er gjørt til nýggja lóg. Arbeitt varð í 2015 við at gera broytingar í lógini, tá ið arbeiðsbólkur varð settur at skriva um "út greinan av lóggávuni á humangenomøkinum". Harumframt er onnur lóggáva sett í gildi, sum krevur broytingar í ílegulógini, t.d. í "løgtingslóg um Fólkaheilsustýrið", "Sundhedsloven" og "Komitéloven". Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um tatovering**
Galdandi lóg um tatoveringar er frá 1966. Tað hevur stóran týdning at fáa nýggja og tíðarhóskandi lóg á økinum, sum eitt nú setir krøv til litirnar og útgerðina, ið verða brúkt, eins og tað verður nágreinað, hvør ið hevur loyvi til at gera kosmetiskar tatoveringar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at dagføra starvsfólkabygningin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi**
Starvsfólkabygningurin hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi skal dagførast. Fyrireikingar eru farnar í gongd. Tá ið fyrisitingin á Klaksvíkar sjúkrahúsi er flutt í Gulu húsini, ber til at fara undir arbeiðið. Fyrsta stigið er at arbeiða við hugskotum til loysnir. Tá ið prosjekteringin er liðug, kann tað tilfarið verða brúkt sum grundarlag fyri nýggjari verklagslóg. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja Steno Miðstøð á Landssjúkrahúsinum**
Samsvarandi avtaluni við Novo Nordisk grunnin er ætlanin at byggja eina Steno Miðstøð á Landssjúkrahúsinum. Fyrireikingarnar eru í gongd. Fyrsta stigið er at arbeiða við hugskotum til loysnir. Tá ið prosjekteringin er liðug, kann tað tilfarið verða brúkt sum grundarlag fyri nýggjari verklagslóg at leggja fyri Løgtingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan**
Arbeiðið við H-bygninginum er komið væl áleiðis. Tó eru framvegis nøkur bygningsarbeiði, ið ikki vóru við í verkætlanini. Málið verður fyrireikað. Tá ið fyrireikandi arbeiðið og prosjekteringin er liðug, kann tað tilfarið verða brúkt sum grundarlag undir nýggjari verklagslóg at leggja fyri Løgtingið.

**Uppskot til løgtingslóg um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgarunum**
Tær kanningar, viðgerðir o.s.fr., sum verða gjørdar uttanfyri Sjúkrahúsverkið, eiga at fara fram í nærumhvørvinum hjá borgarunum. Fortreytin at røkka hesum er, at landið verður skipað í størri og harvið færri heilsuøkir við einari ella fleiri heilsumiðstøðum. Uppgávu- og ábyrgdarbýtið í kommunulæknaskipanini er býtt millum land og kommunur. Skilabest er at hava ein ábyrgdarhava í skipanini, og tað er landið. Ein lóg verður sett í gildi, sum heimilar, at landið fer at umsita alla kommunulæknaskipanina og harvið yvirtekur tær skyldur, sum kommunurnar hava sambært verandi lóg. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ioniserende stråling og strålebeskyttelse (strålebeskyttelsesloven) (Ikrafttrædelse af ophævelsesbestemmelse)**
Endamálið við uppskotinum er at seta úr gildi tær eldri lógirnar á økinum, soleiðis at einans ein lóg regulerar økið, og rættarstøðan hjá borgaranum verður greiðari. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tiltøk at minka um royking (Roykilógin)**
Umleið 120-130 føroyingar doyggja árliga av sjúkum sum verða settar í samband við royking. Hesi andlát kundu verið fyribyrgd um fólk ikki royktu. Tørvur er tí á at seta enn munadyggari tiltøk í verk at minka um heilsuskaðar og heilsuvandar, ið standast av tubbaksroyking. Tað er serliga týdningarmikið at seta tiltøk í verk, sum verja børn og ung fyri heilsuskaðiligum avleiðingum av tubbaksroyki og sum fyribyrgja, at tey fara at roykja. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í heilsutrygdarlógini (undantak fyri gjaldsskyldu)**
Endamálið við lógaruppskotinum er at fáa samsvar ímillum heilsutrygdarlógina og Nordisk konvention om social sikring viðvíkjandi heilsutrygdargjaldi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fólkaheilsustýrið**
Fólkaheilsustýrið varð sett á stovn tann 1. januar 2023. Fólkaheilsustýrið fæst tó við fleiri onnur viðurskifti enn fólkaheilsu. T.d. at ráðgeva í heilsufakligum spurningum, umsita uppgávur hjá Ílegusavninum, tilevna vegleiðingar til heilsulóggávu, umsita tilbúgvingina í heilsuverkinum, gera hagtøl og frágreiðingar á heilsuøkinum v.m. Ætlanin er tí at broyta heitið á stovninum frá Fólkaheilsustýrið til: Heilsustýrið. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

## ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

*Almannamál*

**Uppskot til løgtingslóg um Brekumboð**
Endamálið við lógaruppskotinum er at betra um rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek. Brekumboðið skal virka óheft og hava sum aðalmál at tryggja, at røddin hjá fólki, ið bera brek, gerst týðiligari í almenna rúminum. Uppskotið gevur landsstýriskvinnuni heimild til at seta á stovn eitt Brekumboð og eina nevnd, sum skal ráðgeva Brekumboðnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið fyrst í tingsetuni, og eftir ætlan kann Brekumboðið fara til verka 1. januar 2024.

**Uppskot at broyta løgtingslóg um almannapensjónir**
Tørvur er á at fáa greiðari reglur um innvinnan av rætti til almannapensjón og um, hvørjar pensjónsveitingar kunnu verða veittar pensjónistum, sum fáa føroyska brotpensjón í útlondum. Eisini er neyðugt við greiðari reglum um undantak til rættin hjá borgarum at fáa pensjón frá londum, sum Føroyar ikki hava avtalu við. Skipanin við um- og eftirrokning av pensjón er umsitingarliga tung og kann geva pensjónistum trupulleikar við gjaldføri. Ætlanin er at broyta lógina soleiðis, at pensjónin verður umroknað so hvørt heldur enn einaferð um árið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot at broyta løgtingslóg um áseting av almannaveitingum (mótrokning)**
Í samgonguskjalinum er semja um, at mótrokningin skal eftirmetast. Ætlanin er at leggja lógaruppskot fyri tingið í vár.

**Uppskot at broyta løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.**
Sambært galdandi lóg hava pensjónistar, sum hava nettoinntøkur hægri enn 2.000 kr., ið verða skattaðar sbrt. kapitalvinningsskattalógini, ikki rætt til viðbót til ávísar pensjónistar. Ætlanin er at broyta markið, tí ásetingin rakar pensjónistar við heilt lítlari ogn. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**
Endamálið við uppskotinum er at betra um karmarnar hjá smáum vinnufyritøkum, sum hava starvsmenn í starvi. Ætlanin er, at arbeiðsgevarin í ein ávísan mun skal fáa endurgjald fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, ið verða sjúkir. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til verklagslóg um at byggja sambýli við Rygsá á Argjum til fólk við autismu**
Ætlanin er at byggja eitt nýtt sambýli við Rygsá á Argjum til vaksin fólk við autismu. Sambýlið verður til 24 fólk í fýra eindum, seks fólk búgva í hvørji eind. Sambært ætlan verður bygningurin liðugur á sumri 2026. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til verklagslóg um at byggja sambýli í Vágum**
Ætlanin er at byggja sambýli í Miðvági til 18 fólk. Sambýlið verður í trimum eindum, seks fólk búgva í hvørji eind. Sambýlið kemur fyri verandi bútilboð í oynni. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt**
Útleggingin av eldrarøktini til kommunurnar at umsita er nú eftirmett. Landsstýrið samstarvar við kommunurnar um at fyrireika ávísar broytingar í lógargrundarlagnum, eitt nú at skipa eftirlitið við tænastuni. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at avlýsa servituttar**
Ætlanin við lógaruppskotinum er at avtaka servituttar (treytir hjá landinum) á sambýli og ellis- og røktarheim. Hetta er ein natúrlig avleiðing av, at eldrarøktin er løgd til kommunurnar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Frágreiðing til orðaskifti um heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum**
Nýggj heildarætlan um harðskap í parlagi og nærsambondum við nýggjum átøkum verður handað landsstýrinum. Ætlanin er, at Løgtingið fær høvi at umrøða heildarætlanina. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í heyst.

*Mentamál*

**Uppskot til løgtingslóg um at seta úr gildi biograflógina**
Biograflógin er ótíðarhóskandi og ein leivd frá tíðini tá ið filmseftirlitið var. Lógin samsvarar illa við politikkin hjá sitandi samgongu við at tryggja armslongd. Eisini er ivasamt, hvat tað er, ið landsstýrisfólkið í mentamálum skal geva loyvi til, tá ið eitt nú brunatrygd og hølisviðurskifti eru fevnd av aðrari lóggávu. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg, ið tryggjar armslongd**
Í samgonguskjalinum stendur, at stuðulsjáttanir verða umsitnar sambært armslongdar-meginregluni, og at játtanirnar til ymsu listagreinirnar verða endurskoðaðar og lagdar í fasta legu. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Frágreiðing til orðaskifti um public service-sáttmálan**
Nývalda stýrið fyri Kringvarpi Føroya fer at leggja fram uppskot um nýggjan Public Service-sáttmála fyri Almanna- og mentamálaráðið. Áðrenn sáttmálin verður undirskrivaður, skal Løgtingið hava høvi at umrøða ætlaða innihaldið í sáttmálanum, sum ásett er í § 11, stk. 2 í kringvarpslógini. Frágreiðingin verður løgd fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í kringvarpslógini**
Kringvarpsgjaldið hevur staðið í stað í nógv ár, samstundis sum stórur prísvøkstur hevur verið, sum eisini hevur ávirkað rakstrargrundarlagið hjá stovninum. Landsstýrið fer saman við Kringvarpinum at hyggja nærri at teimum broytingum, ið kunnu styrkja viðurskiftini hjá Kringvarpinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul**
Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið skal styrkjast, og at Miðlastuðulsskipan skal stuðla undir hetta. Landsstýriskvinnan fer saman við Miðlastuðulsnevndini og øðrum viðkomandi umboðum at hyggja nærri at, hvussu miðlastuðulin kann skipast øðrvísi, so vit fáa eitt breiðari og styrkt miðlalandslag. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Verklags- og heimildarlóg til nýggja tjóðleikhúsið**
Nýtt tjóðleikhús skal byggjast sum liður í at útvega føroyskari yrkisleiklist tíðarhóskandi hølisumstøður. 4 mió. kr. eru settar av til fyrireiking í ár. Til tess at halda fram við verkætlanini er neyðugt, at landsstýriskvinnan fær heimild at fara undir ítøkiliga at útvega uttanhýsis fígging til at byggja nýtt Tjóðleikhús. Talan er um at søkja uttanhýsis fíggingarkeldur, t.d. grunnar, ið vilja veita fígging til føroyskar verkætlanir. Umframt tað skal ein heimildar- og verklagslóg gerast fyri projekteringina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Verklagslóg til at umvæla Listasavnið**
Helst verður neyðugt við einari verklagslóg til at fíggja landsins part av arbeiðinum at umvæla alt Listasavnið, so at hølisumstøðurnar verða dagførdar, og neyðugar ábøtur gjørdar. Listasavnið hevur fingið nakrar tilsagnir um stuðul frá útlendskum grunnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um listprýði av almennum bygningum**
Endamálið við løgtingslógini er at skipa listprýðing av almennum bygningum, so at listprýðing og byggilist verður hugsað sum ein heild, og at ein partur av byggikostnaðinum verður settur av til list frá byrjan av verkætlanini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fornminni**
Eftir ætlan verður uppskot lagt fyri Løgtingið um at broyta fornminnislógina soleiðis, at forngripir, ið verða funnir í føroysku náttúruni, eru ogn hjá landinum og skulu latast Tjóðsavninum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Heimildarlóg um at lata stuðul til stórhøll**
Arbeiðið við at byggja tjóðleikvøll til innandura ítrótt gongur sum ætlað. Á fíggjarlógini eru játtaðar samanlagt 30 mió. kr. frá 2022 til 2025. Av tí at samlaða stuðulsupphæddin er hægri enn 10 mió. kr., er neyðugt við serstakari heimildarlóg. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
Nýtt álit er skrivað um broytingar í fólkaskúlalógini, og ætlanin er við støði í hesum at gera uppskot til broytingar, sum ætlanin er at leggja fram várið 2024. Broytingar verða ætlandi gjørdar í fleiri stigum.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving.**
Arbeitt verður í løtuni við at kanna, hvussu heilsurøktarar og heilsuhjálparar kunnu fáa løn undir útbúgving. Í hesum sambandi verður helst neyðugt at tillaga verandi lóggávu. Ætlanin er at hava lógartilmæli klárt á vári 2024

**Uppskot til løgtingslóg um føroyskt sum annaðmál**
Nýggj lóg, sum skipar karmarnar kring undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul**
Lógin um lestrarstuðul má broytast, um møguleiki skal verða hjá t.d. tilflytarum at fáa lestrarstuðul, áðrenn tey hava búð í Føroyum í tvey ár. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Broytingarnar snúgva seg serliga um viðurskifti hjá fosturforeldrum. Lógaruppskotið verður ætlandi lagt fram várið 2024.

**Lógarbroyting um KT í útbúgvingarverkinum**
Lóg kring nýtsluna av Kervi+. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Lóg um føroyska førleikakarmin**
Førleikakarmurin lýsir samlaðu útbúgvingarskipanina í Føroyum, sum m.a. skal brúkast í sambandi við umsókn um luttøku í Bologne-avtaluni. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya**
Lógarverkið kring Fróðskaparsetur Føroya verður dagført millum annað við atliti at sernámsfrøði og skilhaldsreglum. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til fólkaháskúlar**
Dagføra lóg um studning til fólkaháskúlar soleiðis, at stuðulsskipanin gerst lættari at umsita, og ásetingin viðvíkjandi næmingatali verður endurskoðað. Ætlanin er at leggja uppskotið fyri tingið í vár.

**Uppskot til verklagslóg um nýggjan felags bygning á Fróðskaparsetrinum**
Verklagslóg skal gerast um nýggja felagsbygningin á Kampus hjá Fróðskaparsetrinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

## UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingslóg um broyting í Arbeiðsskaðatryggingarlógini**
Endamálið við lógaruppskotinum er at skipa so fyri, at árlig veiting fyri mist vinnuføri verður javnað eftir lønarvøkstrinum í samfelagnum, sum á tann hátt varðveitir sítt realvirði í mun til lønarlagið í samfelagnum. Harumframt tryggjar lógaruppskotið, at persónar við arbeiðsskaða ella vinnusjúku altíð hava rætt til antin arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslógini um Húsalánsgrunnin**
Endamálið við uppskotinum er at geva kommununum heimild til saman við Bústøðum at stovna, byggja og reka almannagagnlig bústaðarfeløg. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)**
Endamálið við uppskotinum er at fremja tær broytingar, sum stýrið fyri ALS hevur mælt til at gera í ALS-lógini. Talan er m.a. um at einshátta kunngerðarheimildirnar, geva persónum undantøk frá gjaldskyldu til ALS, sum fáa ymiska fyritíðarpensjón og framskundaða pensjón og eru í tillagaðum starvi, strika og stytta karantenur og at strika bíðidagarnar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**
Endamálið við uppskotinum er m.a. at gera broytingar viðvíkjandi manningini av Vanlukkutryggingarráðnum, at áseta reglur um fyribils avgerð um mist vinnuføri, at heimila Vanlukkutryggingarráðnum at krevja, at fráboðanir o.a. verður latið talgilt, og at áseta greiða heimild til Vanlukkutryggingarráðið at lata viðkvæmar persónsupplýsingar víðari til tryggingarfeløgini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um at stytta arbeiðsvikuna**
Endamálið við uppskotinum er, at 37 tímar arbeiðsvika verður skipað við lóg. Arbeitt verður við at finna semju um leist í trípartasamráði millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum og almenna myndugleikan. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um veðurlag**
Endamálið við nýggju veðurlagslógini er at áseta bindandi reglur um hvussu vit seta langtíðarmál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, og at Føroyar fylgja altjóða samtyktum og tilmælum um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, og at Føroyar regluliga eftirmeta, um málini at minka útlátið eru nøktandi og verða rokkin. Somuleiðis verður sett á stovn ein ráðgevandi orku- og veðurlagsnevnd við serkønum fólkum at ráðgeva landsstýrinum á orku- og veðurlagsøkinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin)**
Endamálið við lógarbroytingini er at tryggja, at lóggávan skilir greiðari millum kappingarútsett virksemi og netvirksemi og skipanarberandi tænstur, sum natúrligari hoyra undir monopolvirksemið hjá netfelagnum. Ætlandi verða reglur um fjarhita eisini ásettar í elveitingarlógini. Broytingar hava eisini til

endamáls at seta átøkini 1-3, 5-7, 14 og 17 í verk í orku og veðurlagspolitikkinum. Uppskotið fremur avtaluna, sum landsstýrið og SEV gjørdu í 2022. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um pant á íløt**
Endamálið við nýggju lógini um pant á íløt er at gera pantskipanina einfaldari og kundavinarligari. Tryggjast skal, at ein miðsavnað skipan verður og at kundar kunnu lata øll síni íløt við panti inn á sama stað. Harumframt skal lógin geva heimild til at panta íløt til fleiri sløg av úrdráttum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Verklagslóg um nýggja kt-skipan til barsilsskipanina**
Umsitingarskipanin hjá barsilsgrunninum er gomul og ótíðarhóskandi. Skipanin skal nútíðargerast við nýggjum og brúkaravinarligum markamótum. Á henda hátt verða rættindi og skyldur í sambandi við barsilsfarloyvi væl léttari og effektivari at umsita bæði hjá borgarum, vinnu og umsiting. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býarskipan og byggisamtyktir**
Talan er um yvirskipaða dagføring av lógini umframt ítøkiliga at heimila kommunum at áseta bústaðarskyldu í sambandi við nýggjar útstykkingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## LØGMÁLARÁÐIÐ

**Ríkislógartilmæli um dagføring av rættargangslógini**
Nýggj rættargangslóg fyri Føroyar varð sett í gildi 1. januar 2021. Síðani tá eru fleiri lógarbroytingar gjørdar í rættargangslógini í Danmark, sum ætlanin eisini er at gera í rættargangslógini fyri Føroyar, so sum National Enhed for Særlig Kriminalitet og Det Uafhængige Tilsyn med Bevismidler. Harumframt er tørvur á at gera fylgibroytingar til løgtingslógir, sum Løgtingið hevur samtykt, t.d. Foreldramyndugleikalógina og Hvítvasklógina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Ríkislógartilmæli um broyting í Revsifulnaðarlógini fyri Føroyar**
Broytingin heimilar at skipan við fótfjøtrum verður sett í gildi fyri Føroyar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini kap. 1–11**
Føroyskan og dagføring av almenna partinum í revsilógini. Í almenna partinum eru reglur um treytirnar fyri at revsa, so sum aldur á gerningsmanninum, ríkisborgaraskapur, brotsstaður, neyðverja, saknæmi (tilregnelighed), reglur um brotsroynd, meðvirkni og reglur um dømdu revsingina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Broyting í Rúsdrekkalógini I**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva rúsdrekkaframleiðarum í Føroyum at selja sína egnu framleiðslu í egnum sølubúðum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru**
Nýggja lógin um foreldramyndugleika og samveru varð sett í gildi 1. januar 2023. Síðani tá er Familjufyrisitingin vorðin varug við fleiri avbjóðingar. Tørvur er á at nágreina nakrar ásetingar, og tøvur er á nýggjum ásetingum. Hetta snýr seg um ásetingar um viðbótarsamveru, ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru, heimild at taka avgerð um bústaðin hjá barninum og ókeypis advokatumboðan í málum um samveru og bústað. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini I (grooming og sextortion)**
Kapittul 24 í revsilógini viðvíkjandi kynsligum brotsverkum verður broytt soleiðis, at tað verður revsivert, um ein persónur byggir upp samband við eitt barn undir 18 ár, við tí ætlan, seinni at fremja kynsligan ágang móti barninum (grooming). Hugsa verður serliga um tøling av børnum á netinum. Somuleiðis verðar reglurnar um kynsliga avnoyðslu (sextortion) herdar, soleiðis at støður har ofri verður noytt til at fremja kynsligar gerðir við sær sjálvum, kann revsast eftir ásetingunum í §§ 216 – 224, herundir fyri neyðtøku. Uppskotið verður eftir ætlan lagt fyri tingið í heyst, so broytingarnar koma í gildi 1. januar 2024.

**Uppskot til løgtingslóg um at taka gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at heimila kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í revsilógini II**
Ymiskar broytingar skulu gerast í revsilógini, sum til dømis at seta inn § 119 a um chikanu móti almennum starvsfólki, § 216, stk. 2 um kynslig brotsverk móti børnum, § 242 um tráfylging, § 243 um sálarligan harðskap, § 244, stk. 2 um harðskap, § 264 e um samleikastuldur, § 299 c viðvíkjandi broti á kappingarlóggávuna. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Broyting í Rúsdrekkalógini II**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva matstovum at flyta inn vín og øl beinleiðis heldur enn gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um integratión**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at fremja integratión í Føroyum. Yvirskipað eigur ein integratiónslóg at fevna um málfrálæru, kunning og ymisk integratiónstiltøk. Høvuðsdenturin í integratiónslógini eigur at leggjast á tey, sum ætla at verða verandi í Føroyum. Lógin eigur at fevna um tilboð og krøv um frálæru í føroyskum. Eisini er neyðugt, at kunnað verður væl um rættindi og skyldur í føroyska samfelagnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í tilbúgvingarlógini**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at dagføra tilbúgvingarlógina við einum kapitli um kreppustýring, soleiðis at karmarnir rundanum Átaksráðið og Kreppuráðið kunnu skipast við kunngerð. Eisini er ætlanin at broyta ásetingarnar um tilbúgvingarráðið soleiðis, at millum annað samansetingin av ráðnum kann verða ásett í kunngerð.